| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>22. mars 2018 | Blað nr.: 127 |
| | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 22. mars 2018 **Kl**. 18:00
**Stað**: Býráðssalurin
**Málsnr: 48/18-6918**

**FUNDARLEIÐARI:**
Annika Jacobina Olsen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Halla Samuelsen
Bogi Andreasen
Annfinn Brekkstein
Jákup Dam
Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal
Bjørghild Djurhuus
Turið Horn
Bergun Kass (fór av fundi kl. 20.10)
Heðin Mortensen (fór av fundi kl. 20.40)
Bjørg Dam
Jógvan Arge
Odd Færø

**LUTTÓKU EISINI:**
Barbara Vang
Ronni Poulsen
Eyðfríð Jacobsen

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 48/18 | 18/00113-15 | Gunvør Balle: farloyvi frá býráðnum | 130 |
| 49/18 | 18/01198-1 | Tróndur Sigurðsson: farloyvi frá býráðnum | 131 |
| 50/18 | 18/00020-1 | Mál beind í nevndir 2018 | 132 |
| 51/18 | 17/01077-1 | Samanlegging av umsitingini av Uttandura vallum og Ítróttaanleggum | 133 |
| 52/18 | 15/01400-1 | Serstøk nevnd at fyrireika nýggjan svimjihyl | 138 |
| 53/18 | 14/00410-4 | Ynski um at almenna WC í Kollafirði verður beint burtur ella flutt (2013-2233) | 144 |
| 54/18 | 18/00950-1 | Íbúðarbygging á Frúutrøð | 147 |
| 55/18 | 18/00048-6 | Fyrispurningur til Tórshavnar kommunu í sambandi við nýtt Sjósavn á Argjum | 149 |
| 56/18 | 15/03409-23 | Müllers Pakkhús – nýtt gólv til miðhæddina (2. hædd) | 151 |
| 57/18 | 17/00903-2 | Almannaráðið hevur sent kommununi umsókn um grundøkir í Tórshavn til vardar bústaðir. | 153 |
| 58/18 | 18/00808-1 | Vágsbotnur - skipan av økinum | 160 |
| 59/18 | 16/04447-1 | Broyting av serstøku byggisamtyktini fyri Karlamagnusarbreyt | 161 |
| 60/18 | 17/02480-1 | Broyting av almennu byggisamtyktini - nýggjar ásetingar fyri A1 um íbúðir | 165 |
| 61/18 | 17/03314-1 | Fjósið í Homrum í Kollafirði | 168 |
| 62/18 | 18/00871-1 | Broyting av almennu byggisamtyktini fyri matr. nr. 1175d, Hotel Føroyar | 172 |
| 63/18 | 17/03510-2 | Umsókn um kommunalan atkomuveg til húsini á matr. nr. 991k, Velbastaðvegur 33, Tórshavn | 174 |
| 64/18 | 17/03069-2 | Broyting av byggisamtykt av havnaøkinum í Nólsoy | 176 |
| 65/18 | 18/00747-3 | Umsókn um at broyta byggisamtyktina í sambandi við matr. nr. 1292f og 1292a, Tórshavn | 181 |
| 66/18 | 17/03502-1 | Frílendi í Hoydølum - skýli á matr. nr. 58a, Hoyvík | 183 |
| 67/18 | 18/00992-1 | Lendisgøtur 2018 | 186 |
| 68/18 | 14/00178-42 | Fráboðan um vegskráningin á matr. nr. 23l, Velbastað er so | 187 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | | illa frágingin, at tað ríður undan vegnum oman á matr. nr. 23k, Velbastað | |
| 69/18 | 16/04347-1 | Planlegging av kloakkskipan á Stadionøkinum | 195 |

## ***48/18 Gunvør Balle: farloyvi frá býráðnum***

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 48/18 | 18/00113-15 |

**Málslýsing:**
Gunvør Balle hevur boðað frá, at henni berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn samfullar 14 dagar.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Jógvan Arge, eru loknar.

**Býráðsfundur 22. mars 2018: Samtykt.**

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Samtykt.

## 49/18 Tróndur Sigurðsson: farloyvi frá býráðnum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 49/18 | 18/01198-1 |

**Málslýsing:**
Tróndur Sigurðsson hevur boðað frá, at honum berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn samfullar 14 dagar.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av triðvalda tiltakslimi, ið er Odd Færø, eru loknar.

**Býráðsfundur 22. mars 2018: Samtykt.**

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Samtykt.

| **Býráðsfundur**<br>22. mars 2018 | Blað nr.: 132 |
| --- | --- |
| | Formansins merki: |

# 50/18 Mál beind í nevndir 2018

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
| --- | --- | --- | --- |
| 1 Býráðsfundur | 25.01.2018 | 7/18 | 18/00020-1 |
| 2 Býráðsfundur | 01.03.2018 | 30/18 | 18/00020-1 |
| 3 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 50/18 | 18/00020-1 |

**Býráðsfundur 25. januar 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 01. mars 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Einmælt samtykt

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Einmælt samtykt.

# 51/18 Samanlegging av umsitingini av Uttandura vallum og Ítróttaanleggum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 15.06.2017 | 172/17 | 17/01077-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 08.11.2017 | 278/17 | 17/01077-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 15.11.2017 | 263/17 | 17/01077-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 07.03.2018 | 111/18 | 17/01077-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 14.03.2018 | 72/18 | 17/01077-1 |
| 6 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 51/18 | 17/01077-1 |

**Málslýsing:**
Tórshavnar kommuna eigur og rekur nógv anlegg, sum geva borgarunum í kommununi møguleika at íðka og kappast innan ymsar ítróttargreinir. Fleiri av hesum anleggum eru at meta sum tjóðaranlegg, sum hýsa altjóða kappingum og dystum.

Virksemið í kommununi innan ítrótt mennist í stórum, og hentleikarnir og møguleikarnir gerast alsamt fleiri, nú fleiri stórar anleggsverkætlanir eru ávegis ella um at vera lidnar.

Í verandi støðu er virksemið í hallum og vøllum skipað í tveimum eindum t.e. Ítróttaanlegg (konta 5717), ið fevnir um hallir og Uttandura vallir (konta 5710), og sum bygnaðarliga eisini hava tilvísing til hvør sína fyrisitingarliga deild.

**Virksemið hjá Uttandura vøllum**
Virksemið fevnir um rakstur, viðlíkahald, reinhald, umsjón og samskipan av fylgjandi vøllum: Vøllurin inni í Vika, Ovari vøllur og Niðari vøllur í Gundadali, Tórsvøllur, Eysturvøllur, Hoyvíksvøllur og tennisvøllirnir, umframt tilhoyrandi goymslur, bygningar v.m. Undir Tórsvøll kemur eisini umfatandi samskipanin kring landsdystir, steypafinalur v.m. saman við FSF. Sbrt. samtykt fyri útbygging av vesturskýlinum á Tórsvølli skal gerast ein samstarvsavtala við FSF um rakstur- og ábyrgdarbýti av Tórsvølli. Hetta arbeiðið er ikki liðugt, men ætlast uppskot til hesa at verða gjørd til heystar.

Vøllirnir verða brúktir av hundraðtals fólkum at kalla hvønn einasta dag stóran part av árinum.

Uttandura vallir hevur eina árliga nettojáttan á uml. 3.965 tkr. og hevur umleið 3 fólk í starvi. Uttandura vallir koma ikki undir viðlíkahaldsjáttanina hjá Húsaumsitingini, men hava egna játtan til keyp av útbúnaði, til amboð og útgerð, og eisini til viðlíkahald og umvælingar á øllum økinum, tvs. bæði bygningar, skýli, vøllir og uttanumøkið við vøllirnar. Eisini verður kontan nýtt til heilt ella lutvíst at fíggja keyp av graslíki v.m. Roknast skal við, nú 6 fótbóltsvøllir eru í høvuðsstaðnum, at annaðhvørt ár skal ein vøllur hava nýtt graslíki, og hetta kostar uml. kr. 1,75 mió.

**Virksemið hjá Ítróttaanleggum**
Virksemið fevnir um rakstur, viðlíkahald, reinhald, umsjón og samskipan av fylgjandi hallum v.m.:
Høllin á Hálsi, Badmintonhøllin, Hoyvíkshøllin, Ítróttahøllin í Kollafirði, Fimi, Høllin í Skúlanum á Argjahamri, fimleikahøllin í Hoyvíkar Skúla, fimleikahøllin í Sankta Frans Skúla, fimleikahøllin og aula í Eysturskúlanum, dupultfimleikahøllin í Skúlanum við Løgmannabreyt,

hallirnar hjá Skúlanum á Fløtum, t.e. eindirnar á Frælsinum (Stórheyggi) og á Argjavegi. Stórtjald, umframt skoytibreyt (í løtuni niðurløgd!).

Hallirnar hava uml. 12.000 vitjandi um vikuna. Ítróttaanlegg hevur í løtuni uml. 1.465 hallartímar, ið verða leigaðir út um vikuna, umframt kappingar. Harumframt inngongur Ítróttaanlegg í umsitingina av Tórsbreyt og Tórsvølli í samstarvi við uttandura vallir. Størru hallirnar, herundir serliga høllin á Hálsi, er umframt ítróttavirksemi eisini karmur um alskyns virksemi innan mentan, frítíð, handil o.a.

Komandi árini er hugsandi, at enn fleiri anlegg leggjast afturat teimum sum longu eru ella eru ávegis. M.a. verður niðara fimleikahøllin í Finsen gjørd um til eina virknishøll. Um trý ár verður ítróttahøllin í Skúlanum á Fløtum liðug. Politiskt eru ætlanir um langhyl, golfvøll, skjótibreyt og bogaskjótibreyt eisini á skrá.

Virksemið hjá Ítróttaanleggum fer fram frá tíðliga á morgni til seint út á kvøldið og onkuntíð út á næturnar, og fyri flestu hallirnar allar dagar í vikuni og vikuskiftinum. Í vár byrjaði skipan við fastari kvøld- og vikuskiftisvakt hjá Ítróttaanleggum, ið tryggjar regluliga og leypandi umsjón og eftirlit við øllum hallunum innan økið. Anleggini eru um at vera umsitin umvegis skipanina, ið er á www.hallirvallir.fo

Ítróttaanlegg hevur eina árliga bruttojáttan á uml. 7.000 tkr. og hevur 9 fólk í starvi.

Fyrrapart hava skúlar, frítíðarskúlar og Heilsu- og umsorganartænastan tíðir í hallunum, meðan tað í størstan mun eru ítróttafeløgini, sum nýta hallirnar seinnapartin og út á kvøldið, til hallirnar lata aftur.

Ítróttaanlegg virka sbrt. avriksavtalu. Í henni eru fylgjandi missión og visjón orðað fyri virksemið:

**Missión**
Ítróttaanlegg veita karmar og tænastur, ið styðja upp undir eitt virkið ítrótta- og kappingarvirksemi í kommununi. Ítróttaanlegg stuðla og eggja til ein virknan lívsstíl við rørslu og felagsskapi, umframt at veita karmar til tiltøk innan handil, mentan, frítíð o.a.

**Visjón**
Vit vilja, at karmarnir og tænastan kring ítróttin eru á dygdargóðum stigi og stuðla undir ítrótt í fremstu røð, umframt eggja til ein virknan lívsstíl fyri flest allar borgarar.
Vit vilja styðja undir eitt virkið sjálvboðið felagsvirksemi og hava virknan dialog við feløg og brúkarar um menning av tænastuni.

**Nøgdsemi**
Í september gjørdi Ítróttaanlegg eina brúkarakanning við 400 spurdum í aldrinum 15-80 ár í Tórshavnar kommunu. Ein spurningur var "Hvussu nøgd(ur) er tú sum heild við umstøðurnar at røra teg / íðka ítrótt í Tórshavnar Kommunu?". Úrslitið var 5,3 av 7 møguligum, og eigur Ítróttaanlegg ábyrgdina av parti av hentleikunum, talan er um.

**Bygnaður, tilvísing**
Ítróttaanlegg er stovnur við tilvísing til Mentamáladeildina í Trivnaðarfyrisitingini og er undir málsøkinum hjá mentamálanevndini.

Leiðarin á Ítróttaanleggum virkar breitt í samstarvi við aðrar stovnar og eindir innan kommunalu fyrisitingina, umframt samstarv við eina longri røð av felagsskapum, skúlum,

frítíðarskúlum, dagstovnum, sersambondum, fyritøkum, stovnum v.m.

Uttandura vallir eru skipaðir undir deildarleiðaranum á Stjórnarskrivstovuni, sum arbeiðir tætt saman við mentamáladeildini um økið og verkætlanir. Økið hevur altíð verið skipað í Mentamáladeildini, men flutti fyribils í 2014 í sambandi við aðra bygnaðarbroyting í fyrisitingini. Økið er framhaldandi málsøkið hjá mentamálanevndini.

**Fyrimunir og vansar**
Fyrimunur við verandi skipan í tveimum eindum er, at tað er greiður skilnaður millum játtanina til bæði økini. Hetta gevur møguleikar fyri at tryggja, at eitt øki ikki verður fyri vanbýti, um tað skuldi hent, at leiðslan metti, at hitt økið hevði serligan tørv á raðfesting. Tað er tí ikki so stórur vandi fyri, at peningur verður fluttur frá einum øki til hitt.

Verður hugt at vansum við verandi skipan, er greitt, at ítróttarøkið – hvørt tað er høll ella vøllur – er ein og sama natúrliga eind, og tí er nógv, ið talar fyri at leggja hetta saman. Við verandi skipan er økið býtt sundur, og tí kann tað vera trupult at byggja brúgv millum bæði økini og brúka vitan og førleikar hjá hvørjum øðrum, eins og tað helst skuldu verið møguleikar fyri betri at samskipa virksemið á einum samanlagdum øki og m.a. brúka starvsfólk tvørgangandi serliga á vetri og á sumri.

Eisini politiskt er fyrimunur, at málsøkið ítrótt verður fatað og skipað sum ein samanhangandi skipan. Eisini fyri borgaran og feløg er skynsamari, at tey hava somu inngongd til kommununa.

Í verandi skipan er meginparturin av játtanini til viðlíkahald innan hallarøkið undir Húsaumsitingini, og hetta krevur serliga gott samstarv millum deildirnar. Spurningurin um ábyrgdarbýtið við Húsaumsitingina verður tikin upp í sambandi við fíggjarætlanartilgongdina fyri 2018.

Ein fyrimunur við samanlegging er, at øll játtanin verður í einum. Hetta gevur í størri mun møguleika fyri at raðfesta eitt ávíst øki (høll ella vøll) okkurt árið, og soleiðis skjótari fáa avgreitt umvæling ella annað, sum tørvur er á, samstundis sum til ber at raðfesta yvir fleiri ár. Vandin fyri, at okkurt øki kann detta burtur ímillum, er tí lítil. Eisini ber til í leiðslukunningini at skráseta soleiðis, at tað altíð ber til at síggja, hvar raksturin er brúktur, tvs. hvat er brúkt til hvønn einstakan fysiskan bygning ella anlegg.

Um eindirnar verða lagdar saman, fer at bera til at gagnnýta arbeiðsmegina á økinum øðrvísi. Tað fer at bera til at brúka øll starvsfólkini, um tørvur er á tí, t.d. tá størri tiltøk eru, og sostatt fer ein samanlegging at hava við sær, at tað í minni mun verður tørvur á at brúka uttanhýsis arbeiðsmegi. Eisini er ein fyrimunur, at starvsfólkahópurin kann hava ymsar fakligar førleikar, sum við samanlegging kunnu nýtast í allari skipanini.

**Samanumtikið**
Samanumtikið verður mett, at tað er ein fyrimunur, at økið verður lagt undir eitt, eisini játtanarliga. Ítróttarøkið er vorðið eitt av størstu virksemisøkjunum hjá kommununi og fer at vaksa enn meir. Talan er um størstu bygningar og anlegg hjá kommununi, sum hon hevur brúkt stórar íløgur at fáa til vega.

Umsitingin og raksturin av hesum eigur tí at gerast meira nútíðar.

Við samanlegging verður alt samskifti við ítróttafeløg v.m. skipað út frá einum stovni, allar mannagongdir og reglugerðir um nýtslu, treytir v.m. eru savnaðar har. Harumframt er leiðslu- og fyrisitingarliga ábyrgdin savnað, ið sostatt kann leggja ætlanir fyri samlaða økið.

Gerast skal í hesum sambandi ein viðlíkahaldsætlan fyri allar bygningar og anlegg yvir fleiri ár, sum skal geva haldgott játtanarligt og strategiskt grundarlag fyri, at allar ognir verða hildnar og dagførdar, og at økið framhaldandi kann útbyggjast.

**Samanleggingartilgongd**
Av tí at talan er um eina bygnaðarbroyting, er neyðugt at fara undir eina hoyringstilgongd í sambandi við broytingina. Væntandi tekur henda upp til umleið 3 mánaðir. Ætlandi verða stovnarnir endaliga samanlagdir pr. 1. oktober 2017.

Um samanleggingin verður veruleiki, er ætlanin í heyst at taka málið um flokking av leiðaranum av samanlagda økinum upp til nýggja viðgerð.

**Framtíðar skipan av stovninum**
Ætlanin er, at verandi leiðari á Ítróttaanleggum verður leiðari eisini fyri uttandura vøllir. Verandi starvsfólk innan vallarøkið koma við í hópin hjá Ítróttaanleggum. Leiðarin fyri samanlagda økið vísir til mentamáladeildina, samstundis sum deildarleiðarin á stjórnarskrivstovuni fer, hvat vallarøkinum viðvíkur, at hava partvísa funktión sum ráðgevi innan vøllir, umframt samskipan í sambandi við samstarv og markamót við FSF.

Í sambandi við fíggjarætlan fyri 2018 verður støða tikin um, hvussu játtanin til økið verður skipað, men lagt verður her upp til, at játtanin verður savnað til tess at fáa sum mest burturúr.

Í heyst verður gjørt ískoyti til verandi avriksavtalu soleiðis, at vallarøkið eisini kemur við í avtaluna, ið sostatt fevnir um alt ítróttaøkið.

Samanlagdi stovnurin skal harumframt møguliga hava nýtt navn.

**Meting av fíggjartørvi til samanlagda stovnin**
Mett verður, at samanlagdi stovnurin sum útgangsstøði ikki hevur við sær nýggjar umsitingarligar útreiðslur.

Givið er tó, at fleiri nýggj anlegg eru á veg og onnur fara at koma í skipanina, og at tað tí er tørvur á hægri rakstrarjáttan til økið, sí viðmerkingar til fíggjarætlanaruppskotið 2018 hesum viðvíkjandi.

Hartil kemur spurningurin um stilling av gjøldum hjá stovninum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at fara undir tilgongd at leggja Uttandura vallir saman við Ítróttaanlegg.

**Mentamálanevndin 15. juni 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti 8. november 2017:**
Umsitingin hevur framt hoyring um ætlanina við starvsfólkunum innan vallaøkið, leiðaran á Ítróttaanleggum og leiðaran á Stjórnarskrivstovuni. Øll taka undir við ætlanini.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at leggja økini saman pr. 16. november 2017 at rokna. Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 08. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Við samtykt hjá fíggjarnevndini 15. November 2017 í máli 17/01077 blivu uttandura vallir og Ítróttaanlegg løgd saman. Sum liður í at fáa rikið økið undir einum er ynski um at fáa lagt játtanirnar saman t.e. konta 5717 Ítróttaanlegg og konta 5710 Uttandura vallir.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heita á fíggjarnevndina at fáa lagt konto 5710 undir konto 5717 Ítróttaanlegg.

**Mentamálanevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið sum kunning.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Einmælt samtykt.

# 52/18 Serstøk nevnd at fyrireika nýggjan svimjihyl

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 23.04.2015 | 83/15 | 15/01400-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 25.05.2016 | 148/16 | 15/01400-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 225/16 | 15/01400-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 15.06.2016 | 174/16 | 15/01400-1 |
| 5 Tekniska nevnd | 13.06.2016 | 70/16 | 15/01400-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 14.06.2016 | 179/16 | 15/01400-1 |
| 7 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 16.06.2016 | 46/16 | 15/01400-1 |
| 8 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 163/16 | 15/01400-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 06.12.2016 | 314/16 | 15/01400-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 402/16 | 15/01400-1 |
| 11 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 329/16 | 15/01400-1 |
| 12 Býráðsfundur | 26.01.2017 | 46/17 | 15/01400-1 |
| 13 Mentamálanevndin | 16.10.2017 | 266/17 | 15/01400-1 |
| 14 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 77/17 | 15/01400-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 15.11.2017 | 270/17 | 15/01400-1 |
| 16 Býráðsfundur | 22.11.2017 | 266/17 | 15/01400-1 |
| 17 Mentamálanevndin | 10.01.2018 | 8/18 | 15/01400-1 |
| 18 Mentamálanevndin | 07.03.2018 | 82/18 | 15/01400-1 |
| 19 Mentamálanevndin | 11.04.2018 | 132/18 | 15/01400-1 |
| 20 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 52/18 | 15/01400-1 |

**Málslýsing**:
Til tess skjótt at fáa gongd á at betra umstøðurnar til almenna svimjing og kappingarsvimjing í høvuðsstaðarøkinum, verður bygginevndin til 50 m svimjihyl tikin av, og í staðin verður serstøk nevnd við tilvísing til fíggjarnevndina sett at gera allar neyðugar fyrireikingar til bygging av svimjihøll, herundir at:

- Gera neyva tørvslýsing av nýggjari svimjihøll til almenna svimjing og kappingarsvimjing, herundir lýsing av, hvussu verandi svimjihallir í høvuðsstaðarøkinum kunnu nýtast til at nøkta partar av nýtslutørvinum
- Gera uppskot til staðseting av nýggjari høll
- Gera byggiskrá til verkætlan, herundir hølistørv, teknisk krøv og orkukrøv
- Gera kostnaðarmeting og tíðarætlan fyri bygging
- Gera rakstrarætlan, t.e. roknað meting um árligar rakstrarkostnaðir
- Gera uppskot til fígging, herundir møguleikar at fáa til vega fígging frá uttanhýsis pørtum

Serstaka nevndin fyri bygging av svimjihøll verður mannað við politiskum umboðum og umboðum fyri trivnaðarfyrisitingina og teknisku fyrisiting. Fíggjarnevndin setir nevndina, sum í minsta lagi 2. hvønn mánaða leggur statusfrágreiðing fyri mentamálanevndina og fíggjarnevndina, ið skal góðkenna arbeiðið.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti, at seta serstaka nevnd undir fíggjarnevndini at fyrireika nýggja svimjihøll við omanfyristandandi arbeiðssetningi og at velja Elin Lindenskov og Annfinn Brekkstein í nevndina.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørg Dam, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Rúni Djurhuus, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen.

Greiddu ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur 23. mai 2016 samtykt byggiskrá fyri byggiverkætlanina. Byggiskráin er hjáløgd sum fylgiskjal 1 og svarar hon uppá settu spurningarnar og punktini.

Tó viðv. spurninginum um lýsing av, hvussu verandi svimjihallir í høvuðsstaðarøkinum kunnu nýtast til at nøkta partar av nýtslutørvinum, er at viðmerkja:

Tórshavnar kommuna hevur fylgjandi svimjihallir:
1). Svimjihøllin í Kollafjarðar skúla.
Verður brúkt bæði til skúlar og stovnar og er opin fyri almenninginum fleiri dagar um vikuna og alt skúlaárið. Høllin tænir einum lokalum endamáli burturav og er ikki upplagt at broyta nakað tí viðvíkjandi. Høllin er í góðum standi.

2). Svimjihøllin í eindini á Argjavegi hjá Skúlanum á Fløtum (gl. Argja Skúla). Verður brúkt burturav til skúlabrúks. Framtíðin er nógv tengd at, hvussu verður við eindini á Argjavegi tá Skúlin á Fløtum er liðugur í 2020. Uppskotini, ið hava verið nevnd eru til annað kommunalt endamál, so sum innan eldraøkið og hevur Nám X eisini verið nevnt, tó so at í løtuni verður arbeitt út frá, at Nám X fer inn í Handilsskúlabygningin. Alt eftir hvat framtíðar endamálið verður, skal støða takast til, um hylurin framhaldandi skal verða í brúki, ella hølið verður brúkt til annað endamál. Er ynski at minka um rakstrarkostnaðir er viðkomandi at taka støðu til at niðurleggja henda hylin. Høllin er í góðum standi.

3). Svimjihøllin í Hesti. Verður vanliga brúkt summarmánaðirnar. Ikki nøkur ætlan fyribils um nakra broyting. Høllin er í hampiligum standi.

4). Svimjihøllin í Eysturskúlanum. Hylurin verður brúktur til skúlabrúks umframt til kvøldskúla og aðra undirvísing. Mælt verður til at halda fram við honum óbroytt. Er serliga áhugaverd til ymiskar sertørvir, umframt skúlabrúks. Er ynski at minka um rakstrarkostnaðir er viðkomandi at taka støðu til at niðurleggja henda hylin, ið annars er í góðum standi.

5). Svimjihøllin í Gundadali. Er nógv brúkt til alskyns endamál.

Undangóðkenning av ráðgevaratoymum
Umsitingin er í holt við at fyrireika undangóðkenning av ráðgevaratoymum til eina møguliga hugskotskapping, sum ætlandi fer í gongd um miðjan juni og gongur fram til oktober.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjóri, býararkitekturin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja
byggiskránna og at beina málið í býráðið, umvegis byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevndina, náttúru- og umhvørvisnevndina og fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 25. mai 2016:** Útsett.

**Ískoyti**
Sbrt. Býráðssamtykt 23. apríl 2015 er talan um eina serstaka nevnd, sum vísir til fíggjarnevndina. Av teirri orsøk verður viðgerðin av byggiskránni at byrja í fíggjarnevndini, sum so beinir málið víðari til aðrar nevndir, áðrenn endaliga viðgerð í fíggjarnevndini og hareftir býráðsviðgerð.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla fíggjarnevndini til at samtykkja byggiskránna og at beina málið í býráðið umvegis mentamálanevndina, byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevndina, náttúru- og umhvørvisnevndina.

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni og beina málið í býráðið umvegis mentamálanevndina, teknisku nevnd, byggi- og býarskipanarnevndina og heilsu- og umhvørvisnevndina.

**Tekniska nevnd 13. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.

**Mentamálanevndin 15. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 16. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Hugskotskappingin fyri langhyl í Gundadal var útskrivað í august 2016, eftir at Tórshavnar býráð 16. juni 2016 hevði samtykt byggiskránna fyri langhyl í Gundadali.

Trý ráðgevaratoymi vóru undangóðkend til at luttaka í hugskotskappingini.

Tey eru:
- Toymið Ósbjørn Jacobsen Ark.
- Toymið SNA Ark.
- Toymið Árni Winther Ark.

23. november 2016 lótu toymini inn síni boð uppá loysn og vóru tey latin navnloynt soleiðis, at dómsnevndin ikki visti, hvat toymið átti hvat uppskot.

2. desember 2016 hevur dómsnevndin gjørt úrskurð og tilmæli í málinum um, hvat uppskot skal vinna hugkappingina og fáa møguleika at innganga møguliga avtalu um projektering vm. Sí hjálagt dómsúrskurðin.

Hetta mál er tengt at máli 16/01715 Avtala við Ítróttasamband Føroya um ÍSF-húsið vm., ið eisini er til viðgerðar í løtuni.

Á løgukonto 5775 L5610 eru umleið 7.000 tkr. tøkar til verkætlanina. Ætlanin er í næstum at fara undir nærri greiningar og samráðingar við vinnandi hugskotið og koma aftur til nevndarviðgerð við nærri greining av heildarkostnaði, tíðarætlan, útboðsleisti og fíggjarætlan.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, mentamálaleiðari og býararkitekurin mæla mentamálanevndini til at staðfesta úrskurðin hjá dómsnevndini um vinnandi hugskotið og at heimila umsitingini til at fara undir samráðingar við vinnandi ráðgevaratoymið í dómsúrskurðinum um møguliga projektering, umframt gerð av tíðarætlan, útboðsleisti, fíggjarætlan vm. og venda aftur til nevndina við einum uppskoti. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 6. desember 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Mælt verður til at skipa bygginevnd í sambandi við nýggja langhylin samsvarandi vanligu mannagongdini fyri verkætlanir, har býráðið velur 2 limir.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mælir býráðnum til at velja tveir limir í bygginevndina fyri nýggjum langhyli.

**Býráðsfundur 26. januar 2017:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Vald vórðu Bergun Kass og Heðin Mortensen.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur mánadagin.

**Ískoyti:**
Á løgukarminum fyri 2017 eru játtaðar 4.798 tkr. á konto 5775 mentan og frítíð.

Í fjør var hugskotskapping um verkætlanina, ið toymið við SNA ark. v.fl. vunnu. Sbrt. kappingartreytunum fingu tey bæði toymini sum luttóku, men ikki vunnu, 200 tkr. fyri luttøkuna.

Seinni í heyst kemur ætlandi til viðgerðar uppskot til sáttmála við vinnandi ráðgevaratoymið um projektering av verkætlanini.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at játta 420 tkr. av løgukarminum konto 5775, mentan og frítíð á projektkonto L57015 Svimjihøll. Málið verður beint í býraðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 16. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. november 2017:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 22. november 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
Tekstur kemur til fundin.

**Mentamálanevndin 10. januar 2018:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**:
Tekstur kemur mánadagin.

**Ískoyti**
Serstaka nevndin fyri langhyl hevði fund 7. feb. 2018.

Soleiðis var ført í fundarfrásøgnina: "*3. Viðv. tíðarætlan og samráðingunum um projekteringssáttmála. Uppskot um projekteringssáttmála umleið 7 mió. kr. Tøkar eru umleið 4,5 mió. kr. í løgukarminum í 2017. Tað, sum er á karminum, er ikki flutt í 2018 enn. Hinvegin, hvat ið er tøkt, verður vantandi endaligt í mars 18. Stjórnin metir, at projektið eigur at vera forskotið, til fíggingin er tøk til samlaðu projekteringina og rúm er í íløguætlanini fyri byggikostnaðinum. Fundur hevur verið við SNA-toymið um at forskjóta projektið til ársskiftið 18/19. Málið verður lagt fyri mentamálanevndina á einum komandi fundi. Fyribils meting hjá teknisku fyrisiting er, at projektering tekur umleið 1 ár (við fyrivarni) + útbjóðing 2-3 mánaðir.*

*Heðin Mortensen metir ikki, at projektið eigur at útsetast, tí 4,5 mió. kr. eru avsettar í 2017, og eiga at verða fluttar yvir í 2018. Við at avseta restfígging í 2019, verður komið á mál við projekteringini. Síðani avseta pening til bygging av svimjihøllini á íløguætlanini fyri komandi árini.*"

Fráboðað er Havnar Svimjifelag og Svimjisamband Føroya at projektering ætlandi verður planløgd at byrja um árskiftið 2018/19. Í sambandi við gerð av fíggjarætlan fyri 2019 verður ætlandi gjørt eitt uppskot til fíggingarætlan fyri projektering og bygging av langhyli. Vent verður aftur í nevndina við málinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka undir við at projekteringin verður sett at byrja um ársskiftið 2018/19 og at fígging til projektering og bygging verður tikin upp í sambandi við fíggjarætlan 2019.

**Mentamálanevndin 07. mars 2018:** Ein meiriluti, Turið Horn, Marin Katrina Frýdal og Bergun Kass tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Bjørghild Djurhuus, krevja málið fyri býráðið.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Heðin Mortensen, Odd Færø, Bjørghild Djurhuus, Bjørg Dam, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein seta fram soljóðandi broytingaruppskot:

Mælt verður til, at projekteringin av langhylinum fer í gongd beinanvegin, at 4,5 mió. kr., avsettar á fíggjarætlanini 2017, verða fluttar til fíggjarárið 2018, og at restfígging, umleið 2,5 mió. kr. at fíggja projekteringina, verður avsett í sambandi við fíggjarætlanararbeiðið 2019.

Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskotið, ið fall við seks atkvøðum fyri og sjey ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Odd Færø, Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Bjørghild Djurhuus og Bjørg Dam.

Ímóti: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Jógvan Arge.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í mentamálanevndini, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, fimm ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Jógvan Arge.

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Bjørg Dam, Bjørghild Djurhuus og Heðin Mortensen.

Blankt atkvøddi: Odd Færø.

# 53/18 Ynski um at almenna WC í Kollafirði verður beint burtur ella flutt (2013-2233)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 30.04.2014 | 99/14 | 14/00410-4 |
| 2 Kollafjarðarnevndin | 23.06.2014 | 14/14 | 14/00410-4 |
| 3 Tekniska nevnd | 07.10.2015 | 106/15 | 14/00410-4 |
| 4 Býráðsfundur | 29.10.2015 | 191/15 | 14/00410-4 |
| 5 Kollafjarðarnevndin | 19.10.2015 | 11/15 | 14/00410-4 |
| 6 Tekniska nevnd | 01.06.2016 | 66/16 | 14/00410-4 |
| 7 Tekniska nevnd | 11.10.2016 | 102/16 | 14/00410-4 |
| 8 Tekniska nevnd | 06.03.2018 | 19/18 | 14/00410-4 |
| 9 Fíggjarnevndin | 14.03.2018 | 74/18 | 14/00410-4 |
| 10 Kollafjarðarnevndin | 05.04.2018 | 1/18 | 14/00410-4 |
| 11 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 53/18 | 14/00410-4 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í sambandi við vegagerðina hjá Landsverki á vegamótinum viðíbindingina við Sjógv, hevur samskifti verið millum kommununa og Landsverk um ymisk vegateknisk viðurskifti. Harumframt hava umboð frá sp/f Carl August Jensen eisini verið á fundi í sambandi við broyttum ferðsluviðurskiftum (parkering og til-/frákoyringarmøguleikar) eysan fyri teirra ogn, matr. nr.149a, Kollafjørður. Á fundinum var spurt um framtíðar ætlanir hjá kommununi og í framhaldi av hesum, hevur samskifti verið við eigaran um at fáa flutt almenna toilettið.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ongar viðmerkingar

**Upplýsingar frá umsitingini.**
Í sambandi við viðgerðina av ársfíggjarætlanini fyri 2014, var komið inn á spurningin um almenn toilett, millum annað í Steinatúni og í Kollafirði. Niðurstøðan tá var, at tað fyriliggur eingin ætlan at flyta almenna toilettið.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ongar viðmerkingar

**Umhvørvisárin**
Ongar viðmerkingar

**Fíggjarlig viðurskifti**
Tað fyriliggur eingin kostnaðarmeting.

**Viðmerkingar frá øðrum deildum**
Málið hevur ikki verið til hoyringar á øðrum deildum.

**Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum**
Málið hevur ikki verið til hoyringar hjá øðrum myndugleikum.

**Skjøl**
Víst verður til skjøl í málinum viðv. arbeiðinum at dagføra vegamótið við Sjógv.

**Tilmæli:**
Vísandi til at eingin peningur er avsettur til endamálið, mæla tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin til at boða frá, at eingin ætlan er at flyta almenna toilettið.

**Tekniska nevnd 30. april 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Kollafjarðarnevndin 23. juni 2014:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Marin Katrina Frýdal, nevndarlimur, ynskir at viðgera málið.

**Tekniska nevnd 07. oktober 2015:** Ein minniluti, Elin Lindenskov og Sigrun Mohr, mæla til at málið verður viðgjørt saman við málinum um kommunal wc á einum seinni fundi.

Ein annar minniluti, Marin Katrina Frýdal, átalar at kommunala wc í Kollafirði er burturbeint uttan viðgerð í teknisku nevnd og uttan at hava verið til hoyringar í Kollfjarðarnevndini og krevur málið fyri býráðið.

Ein triði minniluti, Bogi Andreasen, átalar at kommunala wc í Kollafirði er burturbeint uttan viðgerð í teknisku nevnd og uttan at hava verið til hoyringar í Kollfjarðarnevndini.

**Kollafjarðarnevndin 19. oktober 2015:** Borgarstjórin greiddi frá málinum. Ynski hjá staðbundnu nevndini er at fáa tað nýggja wc við bátahylin.

**Býráðsfundir 29. oktober 2015:** Málið beint aftur í teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Marin Katrina Frýdal ynskir at viðgera málið í nevndini.

**Tekniska nevnd 01. juni 2016:** Nevndin heitir á umsitingina um at fáa gjørd ítøkilig uppskot um staðseting at leggja fyri nevndina aftur í sambandi í ársfíggjarætlanina 2017.

**Ískoyti:**
Í sambandi við uppskot til staðseting av einum almennum wc í Kollafirði, hevur umsitingin móttikið eitt skriv frá staðbundnu nevndini umboðandi fólkið í Kollafirði, sum vísir á eina staðseting av almennum wc í nýumvælda bátahylinum. Staðbundna nevndin er av tí fatan, at tað hevur stórar fyrimunir fyri bygdina, um wc verður staðsett í bátahylinum og ikki mitt í bygdini - við gamla skúlan, sum ætlanin var. Í bygdini, har sum bussarnir plaga at støðga, eru í dag seks wc sum kunnu nýtast av ferðafólkum. Eitt við kirkjuna, eitt í gamla skúlanum og fýra í Café Kill.

Eisini hevur staðbundna nevndin fingið til vega eitt tilboð upp á eina wc-bingju. Her er talan um tvey wc, tvær brúsur og høli til vaskimaskinu og turkitrumlu (sí skjal 01). Ein slík wc-bingja kann uttan størri trupulleikar bindast í tær veitingar, sum eru í bygninginum hjá bátafelagnum. Har er kalt- og heitt vatn, rottangi og hiti. Einasta størri arbeiðið ið skal gerast

er stoyping av einum fundamentið, sum bingjan skal setast á. Eisini er møguleiki fyri, at fólk frá bátafelagnum standa fyri viðlíkahald og drift av wc'inum.

Í sambandi við, at bátahylurin verður umvældur við nýggjum flótibrúgvum, nýtt hús til vatn og el er gjørt og bátafelagið umvælir- og byggir stóra terassu rundan um felagshúsið eru útlit fyri, at hetta øki verður eitt gott samlingsstað fyri bygdafólkið. Fremmandir stuttleikabátar kunnu leggja til bryggju og ætlanir eru eisini at gera básar til kampingbilar/vognar. Um wc-umstøðurnar verða gjørdar, sum staðbundna nevndin viðmælir eru allar fortreytir fyri einum spennandi og mennandi umhvørvi rundan um bátahylin.

Kostnaðurin fyri eina samlaða wc loysn í bátahylinum liggur um einar 140.000,- til 150.000,- krónur. Sjálv wc-bingjan kostar 108.500,- krónur, tá hon stendur á bryggjuni í Tórshavn og stoypiarbeiðið er mett til uml. 40.000,- krónur.

**Tilmæli:**
Tekniski stórin mælir til at fylgja tilmælinum frá staðbundnu nevndini í Kollafirði soleiðis, at almenna wc verður staðsett í sambandi við bygningin hjá Bátafelagnum í bátahylinum.

**Tekniska nevnd 11. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum

**Ískoyti:**
Í sambandi við at býráðið hevur sett kr. 300.000,- av til nýtt alment wc í Kollafirði, hevur umsitingin framleitt útboðstilfar, sum er latið tveimum veitarum. Fríggjadagin 2. mars 2018 var tíðin farin fyri nær tilboðini skuldu verða inni. Tilboðið frá øðrum Sp/f Buli ljóðaði upp á kr. 264.940,- uttan mvg og hitt tilboðið, sum var frá Húsavarðatænastuni sp/f ljóðaði upp á kr. 371.025,- uttan mvg. Av tí at tilboðið frá Buli sp/f var kr. 106.085,- lægri enn frá Húsavarðatænastuni sp/f hevur umsitingin tikið avgerð um at, mæla til at tikið verður av tilboðnum frá Buli sp/f.

**Tilmæli:**
Økissamskiparin mælir til, at tikið verður av tilboðnum frá sp/f Buli, at málið verður lagt fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina. Íløgan verður fíggjað av konto 8175.

**Tekniska nevnd 06. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Jákup Dam luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2018:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Einmælt samtykt.

Jákup Dam boðaði frammanundan viðgerðini frá, at hann er ógegnigur í málinum og bað um at sleppa av fundi, meðan málið varð viðgjørt. Býráðið tók hesa fráboðan til eftirtektar.

## 54/18 Íbúðarbygging á Frúutrøð

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2018 | 45/18 | 18/00950-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 06.03.2018 | 18/18 | 18/00950-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 14.03.2018 | 79/18 | 18/00950-1 |
| 4 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 54/18 | 18/00950-1 |

**Upprunin til málið:**
Sambært kommmunuætlanini og bústaðarpolitikkinum fyri Tórshavnar kommunu eru visjónirnar fyri kommununa, at fleiri bústaðir skulu gerast í miðbýnum, og at hetta skal gerast við býartætting, har byggilendi og tómir bygningar inni í býnum verða gagnnýttir til bústaðir.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í sambandi við at verandi musikkskúli á Frúutrøð 1 flytur niðan í nýggja Musikkskúlan á Landavegnum við árslok 2018, og verandi læknavirksemi og býargartnari á økinum flyta í onnur høli, hevur umsitingin gjørt uppskot til útboðstilfar av Frúutrøð, matrikkul 645a, í optión. Uppskotið snýr seg um at bjóða lendi við verandi musikkskúla- og læknabygningi út til íbúðarbygging, har ein av treytunum er, at minst helvtin av íbúðunum skulu vera leiguíbúðir, og í minsta lagi 10 av íbúðunum skulu vera eldra- og rørsluvinarligar íbúðir. Av tí at økið liggur miðskeiðis í býnum, er ynskiligt, at fríøkið ella partur av fríøkinum skal vera ein almenn atkomulig park til gagn fyri allan býin.

Uppskotið stuðlar væl undir visjónunum hjá kommununi, og við støði í fjølbroyttum eigaraviðurskiftum av íbúðum, verður lagt upp til búseting við einum breiðum borgaraskara. Harumframt er møguleiki fyri, at eldri ella rørslutarnað kunnu búgva á økinum. Talan verður tískil um býartætting, gagnnýtslu av verandi infrakervi, umframt at gera eitt alment grønt øki/park miðskeiðis í býnum.

Hesin háttur at bjóða eina verkætlan út er ikki royndur fyrr í kommununi. Ætlanin er, at kommunan setur ávísar treytir í útbjóðingartilfarið, og at tey sum bjóða uppá verkætlanina binda seg til at byggja, fíggja og umsita íbúðir og fríøki á økinum.

Hetta merkir, at tey sum bjóða uppá verkætlanina helst eru toymi samansett við ráðgevum, umboð frá byggivinnuni, íleggjarum og møguliga eisini persónum/fyritøkum, ið kunnu umsita leiguíbúðirnar. Vinnandi tilboðsgevi fær optión uppá lendið, og ein søla verður ikki framd, fyrr enn kommunan hevur góðkent eitt liðugt verkætlanaruppskot. Verður ongin verkætlan innan eitt ásett tíðarskeið t.d. 1. ár, ella um kommunan ikki kann góðkenna verkætlanina, fellur optiónin burtur og ongin søla fer fram.

Ætlanin er at bjóða optiónina/verkætlanina út alment í undangóðkenning (prækvalifikatión). Í sambandi við eina prækvalifikatión, kunnu øll, sum lúka ávísar treytir, koma við eini áhugafráboðan, soleiðis at fleiri fáa møguleikan at bjóða uppá verkætlanina.

Økið, matr. 645a, sum talan er um, fevnir um økið á Frúutrøð, Revagarðarnar (Jóan Karls gøta og Í Lon) og ein part av Lützenstrøð.

Fyri at verkætlanin skal kunna lata seg gera, skulu kloakkirnar og vatnleiðingarnar skiftast út á økinum. Havast skal somuleiðis í huga, at tá tosað verður um býartætting, so kann ein av

avleiðingunum verða, at færri parkeringspláss verða í mun til áðrenn ein bygging/tætting fer fram.

Neyðugt verður at skipa matrikkuleringina á økinum, áðrenn verkætlanin verður boðin út. Hvussu hetta verður gjørt, verður treytað av parkeringsviðurskiftunum á matrikklinum. Í dag eru 41 almenn parkeringspláss á Frúutrøð. Mett verður, at verkætlanin ikki fær nøkta parkeringstørvin við teimum 41 almennu parkeringsplássunum umframt tey kravdu parkeringsplássini til íbúðirnar. Tískil verður tað ein uppgáva hjá kommununi at varðveita og skipa verandi almennu parkeringsplássini á aðrari staðseting.

Áðrenn útbjóðingina av verkætlanini skulu grannar hoyrast.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | | | | x |
| **Umhvørvis avleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | x | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | x |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og virkandi býararkitekturin mæla til at bjóða lendið á Frúutrøð, matr. 645a, út í optión til íbúðarbygging sambært útbjóðingartreytum, sum fyrisitingin ásetur, og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Tekniska nevnd 06. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum við tí treyt, at dagføringin av kloakkskipanini verður fíggjað av søluni og at kommunan útvegar sama tal av parkeringsplássum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2018:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal og Bergun Kass, tekur við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við teknisku nevnd og mælir býráðnum til at samtykkja málið við teirri treyt, ið nevndin hevur ásett, umframt teirri treyt, at tað bert skal verða loyvt at byggja tríggjar hæddir í økinum.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Atkvøtt varð um tilmæli frá borgarstjóranum at beina málið aftur í Byggi-og býarskipanarnevndina og Teknisku nevnd, ið varð einmælt samtykt.

# 55/18 Fyrispurningur til Tórshavnar kommunu í sambandi við nýtt Sjósavn á Argjum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2018 | 62/18 | 18/00048-6 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.03.2018 | 75/18 | 18/00048-6 |
| 3 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 55/18 | 18/00048-6 |

**Upprunin til málið:**
Arkitektar 99 senda fyrispurning um víðkan av Sjósavninum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Verandi Sjósavn varð lagt har, við Sandagerð, við tí fyri eyga at savna royndir osv. og finna útav um hetta kundi vera endaliga staðsetingin.

Mett verður, at hetta er rætta staðseting, tað sæst væl úr fleiri ættum og serliga, tá siglt verður inn í Havnina.

Við nýggja Sjósavninum ber til at gera meir burturúr framsýningunum t.d. við fleiri fiskasløgum, hemara, kópi osv.

**Lógir, ásetingar o.a.**
*Stk. 1 Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tilíkt.*
*Stk. 2 Bygging í D1 kann bert loyvast sambært serstakari byggisamtykt, sum er í samsvar við stk. 1.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Vegurin oman til Sjósavnið verður broyttur, parkeringspláss verða løgd fram við vegnum og rundkoyring verður løgd niðri við Sjósavnið, so størri bilar, kunnu venda har.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Ongi onnur mál

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Útbygging kann bert fara fram sambært serstakari byggisamtykt.
Serstøk byggisamtykt er enn ikki gjørd.

**Umhvørvisárin**
Er enn ikki kannað, men kommunan vil seta sum krav, at sjógvurin, sum verður pumpaður niðan í kørini, verður reinsaður, áðrenn hann rennur oman aftur á sjógv.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Hevur ikki verið hjá øðrum deildum, nevndum ella myndugleikum

**Skjøl**
18/00048-5 Sjósavn

**Tilmæli:**

Virkandi býararkitekturin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til at samtykkja, at staðseta nýtt Sjósavn á sama stað sum verandi Sjósavn við Sandagerð, at umsøkjarin kann arbeiða víðari við málinum og at málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Einmælt samtykt.

# 56/18 Müllers Pakkhús – nýtt gólv til miðhæddina (2. hædd)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 14.03.2018 | 76/18 | 15/03409-23 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | | | 15/03409-23 |
| 3 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 56/18 | 15/03409-23 |
| 4 Býráðsfundur | | | 15/03409-23 |

**Málslýsing:**
Í 2015 varð farið undir at leggja nýtt gólv á miðhæddina í Müllers Pakkhúsi. Játtaðar vóru kr. 2.582.000 til endamálið. Byggingin hevði við sær krav um byggiloyvi, tí nýtslan broyttist frá at fevna um goymslurúm til almenna nýtslu. Í byggiloyvinum vórðu krøv sett til brunatrygdina, sum gjørdu, at verkætlanin gjørdist dýrari, og tískil varð í 2016 játtað í alt kr. 3.900.000 aftrat fyri at fáa umvælingarnar lidnar, soleiðis at endaliga byggiloyvið og nýtsluloyvið kundu útskrivast.

Av tí at talan er um ein gamlan bygning, bygdur í 1890-árunum, lýkur hann ikki nútímans reglur og ásetingar sambært bygningskunngerðini, og eru tí serskildar loysnir gjørdar fyri at loysa byggi- og brunaviðurskiftini. Loysnirnar vóru treytaðar av góðkenningum frá m.a. Dansk Sprinkler Teknik og skjalprógvan frá verkfrøðingi, og hevur verið nógv eykaarbeiði í sambandi við at fáa endaligu góðkenningarnar. Eyka arbeiðið hevur havt við sær eina meirnýtslu á løgukontuni kr. 303.516 pr. árslok 2017.

Leigusáttmáli millum Tórshavnar kommunu og Lions Club varð undirskrivaður fyri meira enn einum ári síðani, har virksemið hjá Lions Club skal halda til í einum av glasrúmunum á ovastu hæddini, umframt at teir við jøvnum millumbili fáa høvi at nýta fullu hæddina til tiltøk.

Bygningurin kann sum er ikki takast í nýtslu, tí enn vantar nakað av arbeiði í sambandi við umvælingarnar. Áðrenn endaliga byggi- og nýtsluloyvið kann útskrivast, er neyðugt:

- at gera styrkingar av konstruktiónini á miðhæddini, har víst verður á tvinnar loysnir. Ein timburloysn við skrábondum kann gerast fyri kr. 130.000, meðan ein loysn við stáldragarum og sjónligum jarnboltum kann gerast fyri áleið kr. 300.000 (kostnaðarmeting). Hæddin á miðhæddini er ein avbjóðing, og tískil vil ein timburloysn taka nakað av hæddini, meðan ein loysn við stáldragarum vil skemma bygningina.
- liðugtgerð av el arbeiði og góðkenning frá SEV.
- innbúgv til (glas)fundarhølini á ovastu hæddini, har talan er um tvey borð, stólar og ljós (fýra lampur). Ynskiligt er, at innbúgvið gerst ein partur av bygninginum, og vórðu gomlu hurðarnar í goymsluklivunum á ovastu hæddini varðveittar við tí endamáli at tær kunnu endurnýtast til tvey borð (snikkaraarbeiði).
- skelting og liðugtgerð (krøv eru til brunaskelti v.m.). Talan er um snøklar, sum t.d. brunamáling av einum einkultum vatnrøri v.m.

Verkætlanin varð byrjað uttan fulla fígging, og eru umvælingarnar gjørdar, so hvørt avbjóðingarnar hava víst seg. Áðrenn bygningurin kann takast í nýtslu er neyðugt at gera seinastu umvælingarnar. Kostnaðurin av hesum er mettur at verða áleið kr. 300.000, tá er roknað við eini timburloysn í sambandi við styrkingarnar av kontruktiónini á miðhæddini. Aftrat kemur so meirnýtslan á kr. 303.516, tvs. í alt kr. 600.000 at játta á kontu 5375 Müllers Pakkhús.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at játtaðar verða kr. 600.000 av konto 6175 til kontu 5375 Müllers Pakkhús at gera seinastu umvælingarnar, soleiðis at endaliga byggi- og nýtsluloyvið kunnu útskrivast og bygningurin takast í nýtslu, og at beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og játta kr. 600.000 av konto 6175 til konto 5375 Müllers Pakkhús sum eykajáttan og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Einmælt samtykt.

## 57/18 Almannaráðið hevur sent kommununi umsókn um grundøkir í Tórshavn til vardar bústaðir.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.05.2017 | 98/17 | 17/00903-2 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2018 | 43/18 | 17/00903-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 14.03.2018 | 77/18 | 17/00903-2 |
| 4 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 57/18 | 17/00903-2 |

**Málslýsing:**
Almannaráðið hevur hin 08.03.2017 sent kommununi umbøn um grundøkir í Tórshavn til vardar bústaðir.

Vísandi til bráðfeingis tørvin á nýggjum og tíðarhóskandi vardum bústøðum og bústovnum í Tórshavn, hevur landstýriskvinnan í almannamálum gjørt eina raðfestingarætlan fyri at loysa bráðfeingis tørvin á bústøðum fram til 2011.

Tørvur er á 3 grundøkjum í Tórshavn til nýtt Barnaheim, sambýli fyri fólk við menningartarni og sambýli til fólk við seinheilaskaða.

Ynskiligt er, at kommunan kann veita 3. grundøkir í Tórshavn, íroknað Argir og Hoyvík.

**Grundøki til nýtt barnaheim.**
Mett verður, at nýtt barnaheim skal fevna um rúm til 25 børn, móttøkudeild til 3 børn og eina familjudeild til 3 familjur á 4-5 persónar. Somuleiðis er tørvur á uttanum øki til t.d. spælipláss, fótbóltsvøll og grønmetishava.
Barnaheimið skal somuleiðis fevna um pláss til eftirvernd til ung, og møguliga átti eftirverndin at ligið fyri seg sjálvan á sjálvstøðugum øki.

Mett verður at tørvur er á einum grundstykkið har til ber at byggja 2.000 fermetrar í nýtslustigi. Ynskiligt er at til ber at byggja í tveimum hæddum.

**Grundøkið til sambýli til fólk við menningartarni.**
Sambært meting, kemur eitt nýtt sambýli til fólk við menningartarni at fevna um pláss til 16-20 búfólk. Ynskiligt er at byggja í smærri eindum á 4-5 fólk, sum verða nýttar til felagsfasilitetir.
Bygt verður til fólk, ið eisini hava rørslutarn og tí er tørvur á, at bygt verður í einum plani. Mett nýtslustig 1.000 fermetrar.

**Grundøki til sambýli til fólk við seinheilaskaða.**
Ynskiligt er at byggja sambýli til 16–20 fólk, har hvørt búfólkið hevur egna íbúð á 50 fermetrar umframt felags fasilitetir.
Bygt verður til fólk við rørslutarni og tí er tørvur á at byggja í einum plani.
Metti tørvurin á grundøkinum er eitt nýtslustig á 1.000 fermetrar.

Umsitingin hevur umrøtt spurningin um øki til barnaheim og sambýlir í tráð við býarplanleggingina og vísir á trý øki í ávikavist Tórshavn, Hoyvík og á Argjum. Harafturat verður víst á alternativar møguleikar við Vegin Langa í Hoyvík og Marknagilsvegin:

1. Økið við Stoffalág, matr. nr. 683b, liggur í umráðispartinum A1 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, har ásetingarnar eru:

   1. *Loyvt er einans at byggja stakhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð, og eftir serloyvi frá byggivaldinum tvíhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð og raðhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski.*
      *Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.*
   2. *Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 500 m2. Tá byggingin verður framd eftir serstakari byggisamtykt, kann býráðið loyva, at grundstykkini eru minni enn 500 m2, tó í minsta lagi 400 m2 fyri stakhús og 300 m2 fyri hvønn partin av einum tvíhúsum ella raðhúsum. Ein partur av teirra minstuvídd kann verða lagdur sum felagslendi og sum bilstøðil.*
   3. *Útstykking verður einans loyvd, um hon hóskar við eina útstykkingarætlan, sum byggivaldið hevur góðkent fyri eitt náttúrliga avmarkað øki, og tá ið byggibúningin annars er tryggjað sambært vanligu útstykkingartreytum kommununnar.*
   4. *Byggistigið má ikki fara upp um 0,3*
   5. *Nýtslustigið má ikki fara upp um 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús, ella raðhús. Tó kann tað fyri grundstykkir til stakhús, sum eru 200 m2 ella minni, fara upp til helvtina hægri og fyri stykkir millum 200 m2 og 500 m2 verða sett javnt minkandi soleiðis, sum mynd 3 vísir.*

   Harumframt er økið fevnt av sertøku byggisamtyktini nr. 7, og liggur matr. undir eindini C1, sum er lagt av til Almenningur. Fyri eindirnar C eru ásetingarnar:

   a. *Nýslustigið fyri bygging til stovnar innan C-eindirnar má ikki fara upp um 0,3 fyri náttúrliga avmarkað øki.*
   b. *Byggistigið má ikki fara upp um 0,25*

   Sí viðhefta kort og myndir av økinum.

   Hetta økið krevur sostatt, at man broytir nakrar av ásetingunum fyri økið, soleiðis at byggjast kann til neyðuga endamálið. Mælt verður tó til, at økið verður lagt av til barnaheim.

2. Økið við Rólantsgøtu í Hoyvík, matr. nr. 135e, liggur í umráðispartinum A3 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, har ásetingarnar eru:

   1. *Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.*
   2. *Útstykkingar kunnu bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.*
   3. *Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 400 m2 fyri stakhús, 300 m2 fyri tvíhús og 250 m2 fyri raðhús. Ein partur av hesum kann leggjast sum fríøki, tó í mesta lagi 100 m2 fyri hvørt grundstykki.*

4. *Byggistig 0,3*
5. *Nýtslustigið má ikki fara upp um 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús, ella raðhús. Tó kann tað fyri grundstykkir, sum eru 200 m2, fara upp til helvtina hægri og fyri stykkir millum 200 m2 og 500 m2 verða sett javnt minkandi niður til vanliga ásetta minstuvídd. Í serstakari byggisamtykt kann nýtslustigið verða roknað út frá heildarbyggingini í mun til eitt natúrliga avmarkað øki.*

Ætlanir hava verið um at byggja barnagarð á hesum sama øki, men óvist er, um talan er um eina ítøkiliga ætlan, tí má hesin spurningurin umrøðast í mentamálanevndini.

Sí viðhefta kort og myndir av økinum.

Mælt verður til, at hetta økið verður lagt av til sambýli til fólk við seinheilaskaða.

3. Økið við nýggju rundkoyringina á Argjum, matr. 4cl og 4bs, liggur í umráðispartinum A3 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, har ásetingarnar eru tær somu sum fyri økið við Rólantsgøtu.

   Sí viðhefta kort og myndir av økinum.

   Mælt verður til, at hetta økið verður lagt av til sambýli til menningartarn.

4. Økið við Marknagilsvegin, matr. nr. 881a, liggur í umráðispartinum A1 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, har ásetingarnar eru tær somu, sum fyri økið við Stoffalág, tó undantikið serstøku byggisamtyktina nr. 7.

5. Økið við Vegin langa, matr. 140a, liggur í umráðispartinum A1 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, har ásetingarnar eru tær somu, sum fyri økið við Stoffalág, tó undantikið serstøku byggisamtyktina nr. 7.

**Skjøl:**
Skjøl sum eru tøk í sambandi við viðgerðina av málinum:

- *Rundkoyringin á Argjum_Kort 2 (kort)*
- *Rólantsgøta í Hoyvík_1 (mynd)*
- *Rólantsgøta í Hoyvík_2 (mynd)*
- *Við rundkoyringina á Argjum_2 (mynd)*
- *Vegurin langi_Kort (alternativ) (kort)*
- *Rólantsgøta_Kort (kort)*
- *Stoffalág_Kort (kort)*
- *Við Marknagilsvegin_Kort (alternativ)*
- *Við Marknagilsvegin (mynd)*
- *Við vegin langa_1 (mynd)*
- *Við vegin langa_2 (mynd)*
- *Við vegin langa_3 (mynd)*
- *Stoffalág_1 (mynd)*
- *Stoffalág_2 (mynd)*
- *Við rundkoyringina á Argjum_1 (mynd)*

Avmarkingarnar á kortunum eru bert uppskot, sum skulu umrøðast við Almannaráðið.

Mælt verður til, at nevndin umrøður tær ásettu staðsetingarnar og tekur støðu til hvørji øki nevndin ynskir at lata/selja almannaráðnum, soleiðis at umsitingin kann fara undir samráðingar við almannaráðið um útvaldu staðsetingarnar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja omanfyri útvaldu staðsetingar, og at umsitingin fer undir nærri samráðingar við almannaráðið um útvaldu staðsetingarnar og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. mai 2017:** Samtykt at umsitingin fer í samráðingar við Almannaráðið um staðsetingarnar og vendir aftur til nevndina við niðurstøðuni.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at Almannaráðið hevur heitt á Tórshavnar kommunu um at útvega grundøki til bygging av vardum bústøðum í Tórshavn, var ein statusfundur millum partarnar hin 31. januar 2018.

Trý lógaruppskot vóru í desember mánað løgd fyri Tingið, sum fevna um bygging av nýggjum barnaheimi, bú- og umlættingarheimi til børn og ung við autismu og bygging av tveimum vardum bústøðum til fólk við menningartarni, har annar verður staðsettur á Mýrini í Hoyvík á øki, sum landið frammanundan er ánari av. Fyrireikingarnar eru komnar nakað áleiðis, og eru byggiskráirnar um at verða lidnar. Tann síðsta av hesum er eftir tíðarætlanini liðug í fyrru helvt í apríl. Sí nærri lýsingar av verkætlanunum í skjalinum *Notat_Almannaráðið.*
Arbeitt hevur verið við møguligum staðsetingum, sum kommunan vísti á í mai 2017, og hevur kommunan tikið nakrar av møguleikunum aftur grundað á avtalur á økjunum. Kommunan vísti tí á aðrar møguleikar á statusfundinum.

Ástaðarfundur var hin 16. februar 2018, har víst varð á teir ymsu møguleikarnar.

Av teimum vístu møguleikunum hevur Alamannaráðið víst áhuga fyri hesum staðsetingunum og hava raðfest tey soleiðis:

- *Á økinum matr. nr. 135fe/138a í Hoyvík (Klingran), ynskja vit at staðseta vardan bústað til fólk við menningartarni*
- *Á økinum matr. nr. 140a í Hoyvík (Millum Gilja), ynskja vit sum áður fráboðað at staðseta barnaheimið*
- *Á økinum matr. nr. 1320 í Tórshavn (Yviri við Strond), ynskja vit sum eitt alternativ at staðseta barnaheimið í mun til matr. nr. 140a*
- *Á økinum matr. nr. 4cl, 4cm, 4bs á Argjum (Reynstún/Glyvursvegur), ynskja vit í hesum umfari ikki at staðseta nakran vardan bústað*
- *Á økinum matr. nr. 56 á Argjum (Kvíggjartún), ynskja vit at staðseta bú- og umlættingarheimið til børn og ung við autismu*

Viðvíkjandi teimum raðfestu staðsetingunum hevur býarskipanardeildin hesar viðmerkingar:

- Á økinum matr. nr. 135fe/138a í Hoyvík (Klingran), ynskja vit at staðseta vardan bústað til fólk við menningartarni.
    - Økið liggur í A3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, og er økið ætlað blandaðari bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava

handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt. Soleiðis er ein bústaður til fólk við menningartarni ikki í stríð við almennu byggisamtyktina.
- Í samband við útstykkingar í A3 øki skal serstøk byggisamtykt gerast.
- Byggitørvurin á bústaðnum er uml. 1000 $m^2$. Mest loyvda byggistig í A3 øki er 0,3, og er sostatt tørvur á einum stykki, sum er 3000-4000 $m^2$ til støddar. Matr. nr. 135fe, Hoyvík er uml. 60.000 $m^2$ til støddar,og skal bústaður til fólk við menningartarni byggjast, má hóskandi øki til tess frámatrikulerast.
- Infrakervið er gott - beint við Klingruna, nýggja Eysturoyartunnilin og almenna ferðslu. Møguliga kann atkoma til økið samskipast við ætlaðu verkætlanina í Stórubrekku.
- Bústaður til fólk við menningartarni hóskar seg væl í einum øki, sum longu er merkt av at vera bústaðarøki.

- Á økinum matr. nr. 140a í Hoyvík (Millum Gilja), ynskja vit sum áður fráboðað at staðseta barnaheimið.
    - Økið liggur í A1 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, og er økið ætlað stakhúsum, tvíhúsum, raðhúsum og tílíkum bústøðum til eitt húski. Sostatt má øki broytast til A3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, um eitt barnaheim skal byggjast í økinum.
    - Samstundis sum økið skal broytast til A3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, skal ein serstøk byggisamtykt gerast í samband við útstykkingina.
    - Byggitørvurin hjá barnaheiminum er uml. 2000-2500 $m^2$. Mest loyvda byggistig í A3 øki er 0,3 og er sostatt tørvur á einum stykki, sum er uml. 8000 $m^2$. Matr. nr. 140a, Hoyvík er uml. 250.000 $m^2$ til støddar, og skal barnaheim byggjast, má hóskandi øki til tess frámatrikulerast.
    - Infrakervið er gott, tætt við almenna ferðslu og hugsandi er, at vegur til barnaheimið varð knýtt í Flatarvegin.
    - Eitt barnaheim hóskar seg væl í einum øki, sum longu er merkt av at vera bústaðarøki við nógvum barnafamiljum, samstundis sum tað liggur eitt sindur fjalt í dalinum aftan fyri raðhúsini Millum Gilja. Somuleiðis er økið sera náttúruvakurt, við stórum grønum øki runt um.
- Á økinum matr. nr. 1320 í Tórshavn (Yviri við Strond), ynskja vit sum eitt alternativ at staðseta barnaheimið í mun til matr. nr. 140a
    - Økið liggur í D1 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu og í serstøku byggisamtykt nr. 7 (C1 øki). Sambært almennu byggisamtyktini og serstøku byggisamtyktini er økið lagt til almenning. Sostatt má økið broytast til A3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, umframt at serstaka byggisamtyktin má broytast.
    - Byggitørvurin hjá barnaheiminum er uml. 2000-2500 $m^{2.}$ Støddin á stykkinum er uml. 8700 $m^2$ og hevur tað soleiðis eina hóskandi stødd.
    - Luftfartsvæsnet má hoyrast í samband við at bygt verður tætt við tyrlupallin. Eitt ávíst órógv er eisini av ljóðinum frá tyrluni.
    - Vegurin Yviri við Strond er ein av mest trafikeraðu vegunum í landinum, við m.a. tungum farmaflutningi.
    - Staðsetingin liggur eitt sindur fyri seg sjálvt Yviri við Strond og tykist, sum eitt heim til børn, ikki at fella líka natúrliga inn í økið, sum ein staðseting í Hoyvík (Millum Gilja), ger.
- Á økinum matr. nr. 4cl, 4cm, 4bs á Argjum (Reynstún/Glyvursvegur), ynskja vit í hesum umfari ikki at staðseta nakran vardan bústað.

- Á økinum matr. nr. 56 á Argjum (Kvíggjartún), ynskja vit at staðseta bú- og umlættingarheimið til børn og ung við autismu
    - Liggur í A1 øki, C3 øki og í 4. Grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Um økið skal nýtast til bú- og umlættingarheim til børn og ung við autismu, má økið broytast til C3 øki í almennu byggisamtyktini, sum er ætlað miðstaendamálum, umframt skúlum, almennum stovnum og íbúðum.
    - Samstundis sum økið skal broytast til C3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, skal ein serstøk byggisamtykt gerast í samband við útstykkingina.
    - Byggitørvurin hjá heiminum er uml. 1000 $m^2$. Støddin á stykkinum er uml. 10.000 $m^2$ og hevur tað soleiðis eina hóskandi stødd.
    - Infrakervið er gott, vegur er longu niðan á økið og er tætt við almenna ferðslu.
    - Eitt bú- og umlættingarheim til børn og ung við autismu, hóskar seg væl í økinum, m.a. tí tað liggur tætt við verkstaðið Vón, sum er ein partur av dagligdegnum hjá fleiri av búfólkunum.

Býarskipanardeildin mælir til hesar staðsetingar:

- Vardur bústaður til fólk við menningartarni: Við Klingruna í Hoyvík, matr. nr. 135fe, Hoyvík, sí kortskjal nr. *17/00903-16* Hoyvík (Klingran).
- Barnaheim: Hoyvík (Millum Gilja), matr. nr. 140a, Hoyvík, sí kortskjal nr. *17/00903-16 Hoyvík (Millum Gilja*)
- Bú- og umlættingarheim til børn og ung við autismu: Kvíggjartún, matr. nr. 56, Argir, sí kortskjal nr. *17/00903-16 Kvíggjartún*

**Skjøl:**
Notat_Almannaráðið, journal nr. 17/00903-15
Hoyvík (Klingran), journal nr. 17/00903-16
Hoyvík (Millum Gilja), journal nr. 17/00903-16
Kvíggjartún, journal nr. 17/00903-16
Yviri við Strond, journal nr. 17/00903-16

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at samtykkja útvaldu staðsetingirnar, at gera neyðuga matrikulering og byggisamtyktir og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til prinsipielt at taka undir við at selja lendi sambært útvaldum staðsetingum, og verður málið at leggja fyri aftur fíggjarnevndina, tá ið viðurskiftini viðvíkjandi endaligari staðseting, vídd, byggisamtykt og atkomu v.m. til nevndu lendi eru avgreidd av avvarðandi nevndum og treytað av neyðugum loyvum frá viðkomandi myndugleikum.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2018:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal og Bergun Kass, tekur undir við tilmælinum til fíggjarnevndina og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen, tekur undir við staðsetingini viðv. Bú- og umlættingarheimi, men tekur ikki undir við uppskotnu staðsetingunum til barnaheim og vardan bústað og mælir til, at onnur hóskandi øki verða funnin.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Heðin Mortensen, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein seta fram soljóðandi broytingaruppskot:

Mælt verður til at taka undir við staðsetingini av bú- og umlættingarheimi og av vardum bústaði og at finna aðra staðseting til barnaheim.

Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskotið frá Heðini Mortensen, Hallu Samuelsen og Annfinni Brekkstein, ið fall við trimum atkvøðum fyri, sjey ímóti og trimum blonkum.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Jógvan Arge, Marin Katria Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Blankt atkvøddu: Odd Færø, Bjørg Dam og Bjørghild Djurhuus.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið hjá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri ongari ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Jógvan Arge, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen og Annfinn Brekkstein.

## 58/18 Vágsbotnur - skipan av økinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2018 | 44/18 | 18/00808-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.03.2018 | 78/18 | 18/00808-1 |
| 3 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 58/18 | 18/00808-1 |

**Upprunin til málið:**
Skipan av økinum í Vágsbotni er ein liður og møgulig verkætlan í miðbýarætlanini.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Átøk eru gjørd í Vágsbotni, sum hava virkað til, at býarlívið er nógv vaksið í økinum - serliga um summarið. Trappan, søluplintar, kaféir við uttandura borðreiðing, gistingarhús, handlar og stuttleikabátar seta sín hugnaliga og maritima dám á økið. Vágsbotnur er sostatt ein sterkur miðdepil í miðbýnum, har fleiri funktiónir møtast. Men torgið og uttanum økið er í dag ikki serliga væl skipað í mun til hvørt annað og virksemið á staðnum, ferðslu, trygd v.m. og vantar ein betri skipan og heildarloysn fyri økið.

Í sambandi við at skipa økið í Vágsbotni, skal pláss vera fyri gerandisdegi og veitslu, og hevur tað týdning ikki einans at tryggja pláss til serlig tiltøk. Karmarnir til gerandislívið skulu eisini tryggjast og styrkjast.

Torgið kann skapa betri møguleikar til uttandura virksemi sum t.d. marknaðardagar, borðreiðing og spæl. Ein partur skal framvegis nýtast til bilferðslu til Skálatrøð, men ynskið er at flyta koyribreytina fyri at skapa eitt størri samanhangandi og vælvirkandi torg.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at heimila umsitingini at gera skipanaruppskot av torginum og at íverkseta projektering til skipan av økinum, at játtaðar verða kr. 1 mió. av løgukarminum L00001 á konto 6275 Fríðkan av kommununi til fyrireikandi arbeiðið og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Samtykt við 11 atkvøðum fyri, ongari ímóti og 1 blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Jógvan Arge, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Heðin Mortensen, Odd Færø, Bjørghild Djurhuus og Halla Samuelsen.

Blankt atkvøddi: Bjørg Dam.

Bergun Kass luttók ikki í viðgerðini av málinum.

## 59/18 Broyting av serstøku byggisamtyktini fyri Karlamagnusarbreyt

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.12.2016 | 275/16 | 16/04447-1 |
| 2 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 335/16 | 16/04447-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.11.2017 | 231/17 | 16/04447-1 |
| 4 Tekniska nevnd | 06.03.2018 | 12/18 | 16/04447-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2018 | 33/18 | 16/04447-1 |
| 6 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 59/18 | 16/04447-1 |

**Málslýsing:**
Víst verður til mál nr. 16-03808, har samtykt varð at heita á umsitingina um at endurskoða ásetingarnar fyri økið. (sí hjálagda skjal 16/03808-2)

Meginreglan við skipanini av byggingini fram við Karlamagnusarbreyt er, at mest loyvda hædd á bygningunum fylgir eini linju, ið hevur eitt sindur minni hall enn longdarskurðurin av Karlamagnusarbreyt. Hetta hevur við sær, at hvørt einstakt byggifelt kann hava eina max kotu, sum er hægri enn byggifeltini frammanfyri, og harvið hava møguleika at fáa eitt sindur av útsýni.

Verður loyvið givið til at byggja hægri enn byggisamtyktin ásetur, er meginreglan brotin og tí er tað av týdningi, at verða broytingar framdar, so er týdningarmikið at hesar broytingar eru galdandi fyri størri økir (fleiri byggifelt) og ikki einans fyri eitt serstakt byggifelt. Tað er somuleiðis týdningarmikið, at keypararnir í økinum hava eina meginreglu at fyrihalda seg til, eisini teir, ið longu hava keypt og bygt.

Býarskipanardeildin hevur hugt eftir umsóknini, har ynski hjá keypara av stykki nr. 29, matr. nr. 138db, er at hækka hæddarmarkið upp til 10 m.

Mett hevur verið um umsóknina fyri stykki nr. 29, har nærum eingir bygningar eru bygdir. Í hesum førinum verður ikki mett, at broytingin av hæddini broytir útstykkingina munandi, ei heldur kemur broytingin at ávirkað aðrar grannar í økinum neiligt.
Sí viðheftu skjøl: 16/04447-2,3,4 og 5.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta mest loyvdu hædd á stykkjunum sambært viðheftu skjølum, og at beina málið í Býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. desember 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at keypari av matr. nr. 135nq hevur sent umsitingini fyrispurning um at teirra byggifelt er 7 m frá mark norðanfyri.

Sambært §2 í serstøku byggisamtyktini fyri partin av Karlamagnusarbreyt millum Rólantsgøtu og Ólivantsgøtu, liggur økið í A3-øki í 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Og sambært ásetingunum fyri A3 øki og reglunum um frástøðu í §28 í almennnu byggireglunum hjá Tórshavnar kommunu er vanlig frástøða frá markinum til sethús 2,5 m.

Á matr. nr. 135nq skulu tey í verandi støðu halda seg 7 m frá mark á norðursíðuni orsakað av ásettu byggifeltunum, meðan grannin omanfyri hevur tær vanligu treytirnar á 2,5 m. Hetta merkir, at tað verða gott 9 m millum húsini hjá matr. nr. 135nq og grannan norðanfyri.

Upprunaliga var fríøkið gjørt fyri at geva sethúsunum eina størri frástøðu frá vinnuøkinum. Vinnuøkið varð broytt til sethúsaøki, og tískil er frástøðan væl størri í dag í mun til, hvat vanliga verður ásett.

**Verandi byggifelt**

1. Keyparin rindar ein fastan fermeturkostnað, men støddin á teimum ymisku byggifeltunum er ymisk.

**Dømi 1_Matr. nr. 135nq og 135no**
Matr. nr. 135nq er 488 $m^2$ við einum byggifelti á 224 $m^2$. Lutfallið er 224/488*100= 46 %.
Matr. nr. 135no er 392 $m^2$ við einum byggifelti á 218 $m^2$. Lutfallið er 218/392*100= 55 %.
Munurin kemur í høvuðsheitum av, at markalinjan fyri matr. nr. 135nq er á leið 7 m frá norðurmarkinum í mun til 2,5 m á matr. nr. 135no. Víst verður til kortskjalið Sethúsastykkir, matrikulmørk og tekniskar leiðingar (16/04447-15)

**Dømi 2_Matr. nr. 135qv og 135no**
Matr. nr. 135qv er 374 $m^2$ við einum byggifelti á 133 $m^2$. Lutfallið er 133/374*100= 35%.
Matr. nr. 135no er 392 $m^2$ við einum byggifelti á 218 $m^2$. Lutfallið er 218/392*100= 55%.
Munurin kemur í høvuðsheitum av, at markalinjan fyri matr. nr. 135qv er á leið 7,5 m frá vesturmarkinum í mun til 2,5 m á matr. nr. 135no. Víst verður til kortskjalið Sethúsastykkir, matrikulmørk og tekniskar leiðingar (16/04447-15)

Sum sæst á dømi 1 omanfyri, so er munur á lutfallinum millum stødd á byggifelti og grundøki. Munurin kemur meiri til sjóndar í dømi 2. Hesi dømi vísa somuleiðis á, at eigarar í summum førum hava goldið sama fermeturkostnað við minni byggifelti í mun til aðrar eigarar. Hugsast kann, at fleiri eigarar fara at venda sær til Tórshavnar kommunu við sama fyrispurningi.

**Tekniskar leiðingar**
Eigarin ger vart við, at norðursíðan ikki kann brúkast til nakað, tí skuggað verður fyri sólini í mun til rætningin og tískil verður eisini myrkt á norðursíðuni. Ynskið hjá eigarunum er at sleppa at byggja eftir vanligum fortreytum.

Sami trupulleiki er galdandi fyri matr. nr. 135qu, 135np og 135qt.
Byggifeltini á matr. nr. 135qu, 135qv og 135qw eru væl meiri enn 2,5m frá marki á vestaru síðu, og á norðari síðu galdandi fyri matr. nr. 135qv, men leiðingar eru á økinum.

Tá arbeiðið at skipa vinnuøkið til sethúsaøki varð framt, var eitt av aðalmálunum at varðveita verandi planering og høvuðsleiðingar í økinum. Hetta hevði við sær, at tað í dag ikki er møguligt at planera og staðseta húsini eftir vanligum fortreytum á vestursíðuni á útstykkingini orsakað av høvuðsleiðingunum. Um henda broyting av byggifeltunum er treytað av, at kommunan er fíggjarliga óbundin av broytingini, so skal ikki byggjast omaná leiðingarnar á matr. nr. 135qu, 135qv, og 135qw. Hetta grundað á um brot kemur á høvuðsleiðingina, so skal kommunan sleppa til at umvæla eitt møguligt brot. Byggingin má somuleiðis ikki koma ov nær at leiðingunum.

Umsitingin mælir til, at byggifeltini á útstykkingini verða avtikin, tó treytað av, at tekniska deild góðkennir teknisku viðurskiftini. T.v.s. at matr. nr. 135qu, 135qv og 135qw skulu fyrihalda seg til høvuðsleiðingarnar, sum sýndar á kortskjalinum Sethúsastykkir, matrikulmørk og tekniskar leiðingar (16/04447-15).

Grannarnir, sum liggja upp at stykkjunum, sum verða broytt, skulu kunnast um broytingina. Her er talan um hesi matr. nr.:
135 lp, 135lq, 135lr, 135ls og 135lt

**Skjøl viðkomandi fyri ískoytið:**
Sethúsastykkir, matrikulmørk og tekniskar leiðingar (16/04447-15)
SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI OVASTA PART AV KARLAMAGNUSARBREYT (16/04447-15)

**Tilmæli:**
Virkandi býararkitekturin mælir til at avtaka byggifeltini, treytað av at tekniska deild góðkennir teknisku viðurskiftini, áðrenn málið verður beint í teknisku nevnd og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Byggi- og býarskipanarnevndin hevur samtykt at avtaka byggifeltini fyri ovasta part av Karlamagnusarbreyt og hevur tekniska fyrisiting síðani viðgjørt málið og fyri stykkini vestan- og eystanfyri er byggilinja sett, 1,5 m frá høvuðsleiðingum.

Øll bygging verður framd eftir vanligum fortreytum í sambandi við frástøðu frá mark, undantikið at haldast skal 1,5 m frá høvuðsleiðingunum *Sí kortskjal Byggilinjur_01032018_PAP_SJ.pdf (16/04447-19).* Gráa linjan er byggilinjan. Víddirnar á kortskjalinum er víddin innan byggilinjurnar.

Upprunaliga var matr. nr. 135nl og 135qr eitt grundøki. Partur av grundøkinum var uml. 2,7 m lægri enn bæði veghædd á vestaru og sunnaru síðu, har ætlanin var at gera eina tannlæknamiðstøð við partvísum kjallara sunnanvert á grundøkinum. Tá nú grundøkið var býtt upp í tvey, ynskja eigararnir at fylla tann lága partin av grundøkinum upp í hædd. Hetta hevur við sær, at deksilhæddin á regn- og skittvatnskloakkini koma at liggja umleið 2,7 m undir planeringshædd. Hetta má broytast.

Høvuðskloakkin á eystaru síðu av matr. nr. 135qr liggur so mikið nær markinum, at Uppfyllingin á eysturmarkinum má gerast við skynsemi. Antin má ein gravitatiónsstuðlamúrur úr betong ella ein grótlaðing við stórum laðingargróti gerast framvið markinum, soleiðis at skráin ikki kemur inn yvir høvuðskloakkina.

Kommunan er fíggjarliga óheft av hesum arbeiði, av tí at stykkini vórðu seld samsvarandi tá tað var vinnustykki. Útgangsstøði í útstykkingarætlanini var at halda seg til táverandi planering, og at kloakkirnar ikki skuldi flytast.

**Tilmæli:**
Virkandi býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at bygging framvið høvuðsleiðingum skal haldast 1,5 m frá høvuðsleiðingunum og at annars verður bygt 2,5 m frá marki eftir vanligum fortreytum og at beina málið í býráðið.

**Tekniska nevnd 06. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Atkvøtt varð um tilmæli frá Marin Katrinu Frýdal um at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina, ið varð einmælt samtykt.

Bergun Kass luttók ikki í viðgerðini av málinum.

# 60/18 Broyting av almennu byggisamtyktini - nýggjar ásetingar fyri A1 um íbúðir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2017 | 171/17 | 17/02480-1 |
| 2 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 221/17 | 17/02480-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2018 | 34/18 | 17/02480-1 |
| 4 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 60/18 | 17/02480-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Býarskipanardeildin og byggi- og umhvørvisdeildin hava lagt mál fram um at endurskoða og nútíðargera almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu.

Í sambandi við at nútíðar byggimynstrið í Tórshavnar kommunu, í størri mun enn áður, er merkt av íbúðarbygging, so er tørvur á at endurskoða og nútíðargera almennu byggisamtyktina.
Í verandi líki er torført at góðkenna bygging av íbúðum í t.d. 3 hæddum, har umsitingin metir tað vera møguligt og ráðiligt, tí ásetingar fyri stak- og raðhús loyva ikki slíka bygging.

Nakrar verkætlanir um íbúðarbygging eru antin farnar fyri skeyti ella er mannagongdin týðiliga seinkað vegna broytingar í serstøkum byggisamtyktum fyri økini og almennu byggisamtyktini. Núverandi almenna byggisamtyktin er tískil, í ávísum førum, ein forðing fyri íbúðarbygging. Her kunnu nevnast verkætlanir sum oman Mattalág, Óðinshædd II og Heimasta Horn hjá Bústaðir. Í Óðinshædd er t.d. ikki møguligt at byggja íbúðir við 3 hæddum eftir almennu byggisamtyktini, ei heldur serstøku byggisamtyktini nr. 7, sum er galdandi fyri ein stóran part av eysturbýnum.

Væntast kann, at fleiri øki í Tórshavnar kommunu verða nýtt til bygging av íbúðum í framtíðini, tí mælir umsitingin staðiliga til at broyta byggisamtyktina.
Bygging av íbúðum er harafturímóti eitt ynski hjá kommununi, soleiðis at bústaðartørvur, –býti og –politikkur kann nøktast og fylgjast samstundis sum til ber at tætta um býin. Harafturat er hetta í tráð við samgonguskjalið, sum leggur upp til at umsitingin gjøgnumgongur og dagførir almennu- og serstøku byggisamtyktirnar.

Ásetingarnar fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini eru:
*A1: §5 - Stk.9. Í serstakari byggisamtykt er ikki loyvt at fara upp um tey nýtslustig, ið eru í stk. 5, tá ið økið verður roknað sum heild.*
*Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir*
*Í serstakari byggisamtykt kann víkjast frá ásetingum um tal av hæddum og hæddarásetingum, har lendið er soleiðis háttað, at tað fellur natúrliga inn.*

Uppskot til broyting í niðasta reglubrotið ljóðar soleiðis:
*Í serstakari byggisamtykt kann víkjast frá ásetingum um tal av hæddum og hæddarásetingum, har lendið er soleiðis háttað, at tað fellur natúrliga inn* ***ella har kommunan eftir heildarmeting heldur tað vera ráðiligt.***

Við hesum ískoyti í ásetingunum fyri A1 í almennu byggisamtyktini, um bygging av íbúðum, fær umsitingin skipað hvørji øki verða sett av til íbúðabygging.

Í núverandi løtu eru fleiri verkætlanir, sum Bústaðir og aðrir byggiharrar arbeiða við og kann væntast at fleiri umsóknir um byggiloyvi verða kommununi í hendi í nærmastu framtíð, sum eru útstykkingarætlanir um íbúðir.

**Lógir, ásetingar o.a.**
*A1: §5 - Stk.9. Í serstakari byggisamtykt er ikki loyvt at fara upp um tey nýtslustig, ið eru í stk. 5, tá ið økið verður roknað sum heild.*
*Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir*
*Í serstakari byggisamtykt kann víkjast frá ásetingum um tal av hæddum og hæddarásetingum, har lendið er soleiðis háttað, at tað fellur natúrliga inn.*

*A2: §6 – Stk. 5. Hús kunnu einans verða bygd við í mesta lagi 5 hæddum umframt nýttum lofti og mugu ikki vera hægri enn 15 m til hægsta punkt við útvegg og 18 m mált til mønuna. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.*

*A3: Stk. 1. Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.*
*Stk. 9. Í serstakari byggisamtykt kann víkjast frá tal av hæddum og verða loyvt at byggja hægri og fyriskipað at húsini verða sett í veglinju ella byggilinju, (víkja frá ásettu byggi- og nýtslustigunum og minstu grundstykkjavídd).*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Býarskipanardeildin og byggi- og umhvørvisdeildin hava gjørt vart við, at byggisamtyktirnar í fleiri førum forða fyri at loyvi kunnu gevast, har kommunan metir tað verða ráðiligt.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Mál nr. 17/02748 – Endurskoðan av byggisamtyktum - almenna- og serstakar byggisamtyktir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, virkandi býararkitekturin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla nevndini til at góðkenna ískoytið, har umsitingin kann loyva bygging av íbúðum í sambandi við eina heildarætlan, sum kommunan hevur góðkent og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Kommunan hevur móttikið mótmæli í sambandi við ásetingarnar í A1 umráðispartinum, sum fevnir um bygging av íbúðum, har tað kann víkjast frá ásetingunum um tal av hæddum og hæddarásetingum, har lendið er soleiðis háttað, at tað fellur natúrliga inn «ella har kommunan heldur tað vera ráðiligt».

Í mótmælinum verður gjørt vart við at høvuðsendamálið við at gera eina almenna byggisamtykt er at gera eina yvirskipaða, hóskandi og haldgóða ætlan yvir, hvussu býurin skal skipast og byggjast, nú og í framtíðini. Vanligt hevur hartil verið at gera serstakar byggisamtyktir, sum regulera eitt ávíst – ofta minni – øki, har serlig viðurskifti gera seg

galdandi, ið gera, at hetta ítøkiliga økið eigur at verða regulerað fyri seg, tí tað ikki hóskar inn í yvirskipaðu ætlanina.
Lagt verður afturat, at byggisamtyktirnar eru til fyri at tryggja – bæði núlivandi og komandi borgarum, at tað altíð eru yvirskipað heildarsjónarmið, sum liggja aftanfyri, tá avgerðir viðvíkjandi bygging og lendisnýtslu verða tiknar.

Tey, ið hava ritað mótmælið, óttast fyri, at tað verður tænt ávísum byggiharrum, ið sleppa at byggja hægri enn ásetingar fyri bústaðarøki í almennu byggisamtyktini loyva og at hópin av smærri, men høgum íbúðarbygningum fara at stinga seg upp inni ímillum vanlig sethús, uttan at tað er gjørd nøkur yvirskipað heildarmeting av, hvørjar avleiðingar hetta kemur at hava. Tey leggja afturat, at endamálið er at geva kommununi «blancoloyvi» at víkja frá hæddarásetingunum í økisparti A1, tá um íbúðarbygging ræður.

Nýggju ásetingarnar fevna um allan býin og mælir umsitingin til, at ískoyti fyri A1 ásetingarnar í almennu byggisamtyktini, sum mótmælt verður um, verður viðgjørt saman við málinum 17/02748 - Endurskoðan av byggisamtyktum – almenna- og serstakar byggisamtyktir.
Ætlanin við at endurskoða byggisamtyktirnar varð samtykt á býráðsfundi 28. september 2017.

**Skjøl:**
Mótmæli, journal nr. 17/02480-6.

**Tilmæli:**
Virkandi býararkitekturin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til, at ískoytið fyri ásetingarnar í A1 umráðispartinum í almennu byggisamtyktini verður viðgjørt í sambandi við arbeiðið um at endurskoða almennu- og serstøku byggisamtyktirnar, og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Samtykt við sjey atkvøðum fyri, ongari ímóti og fimm blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Jógvan Arge, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn og Bjørghild Djurhuus.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Odd Færø, Bjørg Dam, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Bergun Kass luttók ikki í viðgerðini av málinum.

## 61/18 Fjósið í Homrum í Kollafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Kollafjarðarnevndin | 16.10.2017 | 6/17 | 17/03314-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.11.2017 | 212/17 | 17/03314-1 |
| 3 Kollafjarðarnevndin | 13.11.2017 | 8/17 | 17/03314-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.11.2017 | 227/17 | 17/03314-1 |
| 5 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 304/17 | 17/03314-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.02.2018 | 18/18 | 17/03314-1 |
| 7 Tekniska nevnd | 06.03.2018 | 13/18 | 17/03314-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 14.03.2018 | 82/18 | 17/03314-1 |
| 9 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 61/18 | 17/03314-1 |

**Málslýsing:**
Í sambandi við, at kommunan keypti Hamrabø í Kollafirði, matrikul 91l, keypti kommunan eisini fjósið og lendið kring tað. Talan er um útsynningspartin av matriklinum, ið liggur uppat gamla bygdavegnum í Homrum.

Umsitingin hevur umrøtt, hvat økið og fjósið kann brúkast til. Mett verður ikki, at kommunan hevur brúk fyri ognini. Av tí at fjósið ikki er eitt prýði fyri økið verður mælt til, at fjósið verður tikið niður og lendið brúkt til bústaðarendamál, vísandi til stóra eftirspurningin eftir bústøðum í Kollafirði.

Av tí at økið er rættiliga lítið og atkomuvegur til granna ognir er á økinum, eru ávísar avbjóðingar í mun til at skipa økið.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini mæla til, at fjósið verður tikið niður og at leggja málið um skipan av økinum fyri Byggi- og býarskipanarnevndina.

**Kollafjarðarnevndin 16. oktober 2017:** Staðbundna nevndin ynskir at fjósið verður tikið niður og eitt framtíðarynski er at eitt eldrasambýli verður bygt har.

**Ískoyti:**
Býarskipanardeildin hevur viðgjørt økið, sum fjósið stendur á, í einum býarskipanarligum sjónarmiði í sambandi við ynskið um at brúka lendið til bústaðarendamál.

Økið er fríøki í sambandi við útstykkingina á Hamrabøi, og skal serstaka byggisamtyktin broytast, um økið, sum fjósið stendur á, skal frámatrikulerast. Og tískil skal útstykkingin leggjast fyri nevnd aftur.
Umsitingin skal kanna, um útstykkingin tolir at missa fríøkið, sum fjósið stendur á.

Á økinum liggja servituttir, sum er atkomuvegur hjá grannaognum.
Matr. nr. 95, 96 og 99 eiga atgongd til og uttanum húsini (sí skjal Avrit úr tingbók 17/03314-4).
Matr. nr. 99 liggur norðanfyri útstykkingina á Hamrabøi.
Matr. nr. 91k, sum liggur fyri endan á atkomuvegnum, er ikki nevnt í skeytinum. Koyrirættur og vegatkoma skulu tí endurskoðast, soleiðis at øll kunnu eiga rætt til vegin.

**Skjøl:**
Avrit úr tingbók 17/03314-4

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til, at umsitingin arbeiðir víðari við málinum í sambandi við at umskipa økið við atliti til matrikulering, vegaatkomu, broyting av byggisamtykt o.ø. til næstkomandi fund.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Kollafjarðarnevndin 13. november 2017:** Staðbundna nevndin tekur undir við at stykkið verður selt í fríari sølu og at fjósið verður tikið niður.

**Ískoyti:**
Áhugi er at keypa økið, sum fjósið stendur á og at byggja sethús á økinum. Áðrenn sølan kann fremjast, skal fjósaøkið fevnast av umráðisparti A1 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum bústaðarøki.

Kommunan sendir umsókn inn til Umhvørvisstovuna, har víst verður á at ætlaða broytingin er í samsvar við byggisamtykt, at byggiloyvi er ella verður givið, friðingarviðurskifti um neyðugt og atkomuviðurskifti.

Torført er hjá Umhvørvisstovuni at siga okkum, hvussu leingi viðgerðin frá teimum kann taka. Avgreiðsla kann taka frá 1-2 mánaðir til 6 mánaðir ella meir. Alt eftir um talan er um tunga viðgerð ella skjóta avgreiðslu.

Fríøkið í dag fevnir um ein veg, asfalt og atkomu til bygningarnar, og eingin dámur av einum fríøki er á økinum. Býarskipanarliga liggur hetta økið ikki sum ein partur av útstykkingini, tískil sýnast ongar avbjóðingar at taka økið, sum fjósið stendur á, úr serstøku byggisamtyktini fyri Hamrabø.

Økið, ið fjósið stendur á, er umleið 1.058 $m^2$, og verður samlaða víddin av útstykkingini á Hamrabøi eftir broyting umleið 20.904 $m^2$.
Útstykkingin á Hamrabøi tolir at missa fríøki, sum fjósið stendur á. Samlaða víddin er 21.962 $m^2$, grundstykki og vegur fylla umleið 14.800 $m^2$. Umleið 7.600 $m^2$ er restøki og er tað væl meir enn 10% av samlaðu víddini.

Sambært almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, Kap III, § 1, stk. 7:
*Umframt øki til vegir, parkering, reinsiverk o.l. skal Hóskandi øki upp á minst 10% av samlaðu víddini verða lagt til felagsøki herundir spælipláss, fríøkir v.m.*

Kortskjalið til serstøku byggisamtyktini verður broytt til ikki at fevna um fjósið, soleiðis at almenna byggisamtyktin A1 verður galdandi fyri økið, og arbeiðir umsitingin víðari við at skipa økið býarskipanarliga og leggja fram uppskot til ætlaðu matrikulering, atkomuviðurskifti, leiðingar og parkering.

Á økinum eru vegaatkoma og servituttir, ið hædd má takast fyri. Rætt er at umskipa økið soleiðis, at allir ognir á økinum fáa rætt til atkomuvegin.

**Skjøl:**
Serstøk byggisamtykt fyri útstykking á Hamrabøi (áðrenn) (17/03314-2)
Serstøk byggisamtykt fyri útstykking á Hamrabøi (Eftir broyting) (17/03314-2)

**Tilmæli:**
Virkandi býararkitekturin mælir til at góðkenna uppskotið um broyting av serstøku byggisamtyktini fyri Hamrabø til frama fyri bústaðarbygging á økinum, sum fjósið stendur á, at umsitingin arbeiðir víðari við at viðgera økið býarskipanarliga, matrikulering, atkomuviðurskiftum, parkering, leiðingar á økinum og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Á býráðsfundi 14. desember varð samtykt at økið, sum fjósið stendur á, varð tikið úr serstøku byggisamtyktini fyri Hamrabø í Kollafirði.

Umsitingin hevur viðgjørt økið í sambandi við at menna økið til bústað. Økið, har fjósið stendur, er uml. 600 m$^2$ og kann býtast í tvey grundstykki, um ein møguligur keypari ynskir tað. Í løtuni fyriliggur eingin ítøkilig verkætlan til útstykking.

Um økið verður skipað til bygging, uttan at ein ítøkilig verkætlan fyriliggur, kunnu avbjóðingar stinga seg upp, m.a. at matrikulstovan kann krevja atlit, ið vanliga verða sett til bygging.

Í løtuni er óvist hvør keyparin er, og hvat virksemi kemur at vera á økinum. Er talan um eitt grundstykki, at býta í tvey grundstykki, heim til eldri ella annað, so hevur hetta ein leiklut í skipanini av vegi og parkering.

Sum kjortskjalið *Skipan av økinum* (17/03314-2) sýnir, so er verandi atkomuvegur longdur við uml. 8-9 m, sum gevur eigaranum av matr. nr 91k, atkomu til sítt økið. Gerð av vegi, sum er við hornið inn til matr. nr. 91k, kann fíggjast av søluni og verður mett at kosta uml. kr. 30.000. Minsta breidd av innkomuvegnum er 5 metrar og verður mælt til, at vegurin skal í minsta lagi varðveita 5 metrar breidd.

Kloakkviðurskiftini eru ein avbjóðing við vegin í Homrum, ið eru heldur ókend í løtuni, tí ongar skipaðar leiðingar eru á staðnum. Í løtuni er eingin kloakk á økinum, har fjósið er, og rennur kloakkvatn frá húsunum í veitina niðanfyri bygdavegin. Staðið er skitið av tí sama og trívist mong rotta. Tað er als ikki ráðiligt at lata leiðingar renna í eina veit, sum geva ringan lukt á økinum, har tað somuleiðis er gott hjá rottu at vera. Útstykkingin í Homrum er bundin í skipaða kloakk við kirkjugarðin.

Dagførd kloakkskipan er gjørd til kirkjugarðin vestanfyri í Kollafirði. Sambært góðkendari spillivatnsætlan hjá Tórshavnar kommunu, var ætlanin at fara undir arbeiðið at savna kloakkirnar Við Sjógv í Kollafirði í skipaða leiðing. Talan var um at skipa kloakkleiðingina frá Botnavegnum, Við Sjógv, Bøgøtu og Steinsgøtu og leiða tær út á streymasjógv (mál nr. 14/01989). Sí kortskjal Projektuppskot (17/03314).

Næsta stigið eigur at verða frá kirkjugarðinum og longur eystureftir framvið fjósinum (í Homrum). Har dagførdu leiðingarnar enda og til økið, sum fjósið stendur á, er umleið 280 metrar. Ein avbjóðing kann vera vegurin, ið er sera viðkvæmur, tí mett verður at hann liggur á mold.

Vísast kann til kunngerðina um spillivatn:
*§ 8. Spillivatn skal ikki leiðast út í løkir, áir, veitir, vøtn, strond, fjøru o.tíl.*
*Stk. 2. Einans vatn, ið kann metast sum regnvatn, kann leiðast út í áir, veitir, fjøru o.tíl.*
*Stk. 3. Spillivatn skal leiðast burtur í afturlatnum spillivatnsskipanum.*

**Skjøl:**
Skipan av økinum (17/03314-2)
Projektuppskot – leiðingar (17/03314-2)

**Tilmæli:**
Virkandi býararkitekturin mælir til at frámatrikulera økið sambært kortskjali *Skipan av økinum*, fyri síðani at selja økið til bústaðarøki, har fjósið er staðsett og at beina málið í teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. februar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at kloakkleiðingarnar til økið verða dagførdar samstundis sum økið verður útbygt og at hetta verður fíggjað av søluni.

**Tekniska nevnd 06. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2018:** Samtykt at mæla býráðnum til at selja økið, tá ið kloakkviðurskiftini eru dagførd.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Einmælt samtykt.

Bergun Kass luttók ikki í viðgerðini av málinum.

# 62/18 Broyting av almennu byggisamtyktini fyri matr. nr. 1175d, Hotel Føroyar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2018 | 36/18 | 18/00871-1 |
| 2 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 62/18 | 18/00871-1 |

**Upprunin til málið:**
P/F Gist og Vist hevur sent umsókn um at útbyggja Hotel Føroyar sambært kortskjali *Tekningar frá Búsetur (18/00871-2)*.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Ætlanin frá umsøkjara er at byrja bygging av vesturlonini á vári 2018 og av eysturlonini á vári 2019. Brunaskipanin verður bundin uppí verandi ABA skipan, sama er við øðrum viðurskiftum so sum reinsiverk, ventilatión, hitaskipan, v.m.
Við útbyggingini eystur- og vestureftir fær hotellið uml. 80 kømur afturat, og nýggj parkeringspláss eru eisini við í ætlanini.

Byggiloyvi verða útskrivaði treytað av, at almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu verður broytt, soleiðis at C2 økið verður víðkað til at fevna um nýggju bygningarnir. Fyri at byggisamtyktin kann broytast er neyðugt at søla av lendinum verður framd, og er umsøkjarin kunnaður um at seta seg í samband við Búnaðarstovuna og at málið hevur skund nú ætlanin er at byrja bygging í vár.
Uppskotið til broyting av byggisamtykt er sýnt á kortskjali *Hotel Føroyar – eftir broyting (18/00871-2)*.
Vestanfyri verður C2 økið víðkað við omanfyri 1000 $m^2$, meðan eystanfyri verður víðkað við omanfyri 4000 $m^2$.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Matr. nr. 1175d er í umráðispartinum C2 í 3. grundumráði og er 39.647 $m^2$ til víddar og veglutur er 1.242 $m^2$.

1. *Umráðisparturin verður í síni heild lagdur til miðstaðarendamál, serstakliga ætlað stovnum, framsýningarhølum, samkomuhúsum, tónleikahøllum og øðrum mentunarligum stovnum og tílíkum, og til tænastuvirksemi, ið hava samband við hesi, skrivstovur, matstovur o.t.*
2. *Útstykking verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt, ið byggivaldið hevur góðkent fyri eitt natúrliga avmarkað øki.*
3. *Byggistigið má ikki fara upp um 0,25.*
4. *Nýtslustigið má ikki fara upp um 0,5.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ongar viðmerkingar

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Ongar viðmerkingar

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ongar viðmerkingar

**Umhvørvisárin**
Ongar viðmerkingar

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongar viðmerkingar

**Skjøl**
*Tekningar frá Búsetur (18/00871-2)*
*Hotel Føroyar – fyri broyting (18/00871-2)*
*Hotel Føroyar – eftir broyting (18/00871-2)*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávisar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingar avleiðingar | | | | |
| Unhvørvis avleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Virkandi býararkitekturin mælir til at ganga umsóknini á møti, soleiðis at almenna byggisamtyktin hjá Tórshavnar kommunu fyri matr. nr. 1175d verður broytt samsvarandi kortskjalinum, ið sýnir broytingina, treytað av, at søla av lendinum verður framd, at øll neyðug viðurskifti eru komin í rættlag í sambandi við útstykkingina og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Einmælt samtykt.

Bergun Kass luttók ikki í viðgerðini av málinum.

# 63/18 Umsókn um kommunalan atkomuveg til húsini á matr. nr. 991k, Velbastaðvegur 33, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 06.03.2018 | 14/18 | 17/03510-2 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2018 | 35/18 | 17/03510-2 |
| 3 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 63/18 | 17/03510-2 |

**Upprunin til málið:**
Eigari av matr. nr. 991k á Velbastaðvegnum, Tórshavn, hevur sent umsókn um gerð av kommunalum vegi til hús síni.

Matr. nr. 991k eigur ikki stubban við innkoyring frá Velbastaðvegnum, men er tað tinglýst, at tey skulu hava atkomumøguleika til húsini. Tey boða frá, at tað er ofta ruðuleiki við bilum í túninum, og eru tey klagaði fleiri ferðir til kommununa av grannum, serliga vegna sløkkiliðsbilum í túninum. Eigari av matr. nr. 99b, ið eigur vegin, ynskir ikki, at tey stilla bilar ímóti hennara húsi, tí hon bakkar oman móti matr. nr. 991k fyri at sleppa út á høvuðsvegin. Av tí at umsøkjarahúskið er sløkkiliðsfólk, er umráðandi hjá teimum at altíð sleppa skjótt avstað.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Nakrar byggiætlanir liggja fyri endan á Vatnsoyrarvegnum, barnagarðurin byggir garð, og nýggju útstykkingarnar vestanfyri á matr. nr. 992i og 992k merkja sjálvsagt, at tað gerst enn meiri trongligt við endan á Vatnsoyrarvegnum.

Treytað av, at nakrir metrar av grundøkinum hjá Dagstovninum við Velbastaðvegin kunnu takast til atkomuvegin, er møguleiki at staðseta hann sum sýnt á kortskjali Atkomuvegur til matr. nr. 991k (17/03510-3).

Umsitingin mælir til, at nýggjur vegapartur verður gjørdur, so umsøkjarin fær koyrt inn í bilhúsið uttan avbjóðingar og uttan órógv fyri grannar. Ynskið hjá umsøkjaranum er seinni at gera eitt carport ella bilhús upp ímóti bilhúsinum, sum grannin hevur fingið loyvi til at byggja. Sí mál nr. 17/02471 - Umsókn um byggiloyvi til bilhús á matr. nr. 996l, Tórshavn.

Kommunan skal vera fíggjarliga óheft við planering og vegagerð. Vegaparturin verður tó partur av Vatnsoyrarvegnum, sum er kommunalur og verður tískil partur av vanligum viðlíkahaldi og røkt hjá kommununi.

Húsaumsitingin, sum umsitur Dagstovnin við Velbastaðvegin, hevur meldað út, at ein marknaumskipan kann lata seg gera, tí dagstovnurin hevur ríkiliga stórt øki hjá børnunum at vera á. Leiðslan í dagstovninum er kunnað. Økið til dagstovnin (matr. nr. 992c) er 6.471 $m^2$ í vídd og er økið, ið verður til vegin uml. 100 $m^2$.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ongar viðmerkingar

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
17/02472 - Umsókn um byggiloyvi til bilhús á matr. nr. 996l, Tórshavn

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ongar viðmerkingar

**Umhvørvisárin**
Ongar viðmerkingar

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Tekniska deild metir, at eingin forðing er fyri, at ein atkomuvegur verður gjørdur til matr. nr. 991k, treytað av matrikulerings viðurskiftum.

**Skjøl**
991 K Velbastaðvegur (17/03510-3)
Atkomuvegur til matr. nr. 991k (17/03510-3)

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvis avleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:**
Virkandi býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til, at vegur verður gjørdur, soleiðis at atkoma verður til matr. nr. 991k frá Vatnsoyrarvegnum, treytað av at Tórshavnar kommuna er fíggjarliga óheft av gerð av vegnum, at verandi garður og hegn við dagstovnin verður gjørt aftur, at tekniskt prosjekt verður góðkent av teknisku fyrisiting, at marknaumskipa vegin úr matr. nr. 992c og at beina málið í býráðið.

**Tekniska nevnd 06. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Einmælt samtykt.

Bergun Kass luttók ikki í viðgerðini av málinum.

# 64/18 Broyting av byggisamtykt av havnaøkinum í Nólsoy

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.11.2017 | 204/17 | 17/03069-2 |
| 2 Nólsoyarnevndin | 22.02.2018 | 1/18 | 17/03069-2 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2018 | 37/18 | 17/03069-2 |
| 4 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 64/18 | 17/03069-2 |
| 5 Nólsoyarnevndin | 05.04.2018 | 2/18 | 17/03069-2 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Umboð fyri Tórshavnar Havn hava vent sær til stjórnina í Tórshavnar kommunu viðvíkjandi havnaøkinum í Nólsoy. TH siga seg fáa fyrispurningar um bæði gamla fiskavirki og egningarskúr, um aðrir bygningar, um neyst og smábátar og annars um viðurskifti, ið ikki snúgva seg um havnavirksemi, men í ov stóran mun áhugamál hjá privatum fólki. Tískil meta TH, at eitt stórt øki er teimum óviðkomandi, tí tað er ikki teirra ábyrgdarøki og uttan fyri teirra vanliga umsitingarliga arbeiði og førleikar og hava sent uppskot um broyting av byggisamtyktini fyri havnaøkið í Nólsoy.

Havnaøkið uttan fyri molarnar:
Eitt stórt øki er avlagt til havnaøki uttan fyri verandi molar, bæði sunnan og norðan fyri verandi grótkøst. TH siga seg hava ringt at ímynda sær, at molarnir verða fluttir longur út tey næstu nógvu árini, og tí átti ásetingin um havnaøkið uttan fyri molarnar at verða tikin burtur.

Havnaøkið innanfyri molarnar:
Verandi havnaøkið umfatar alt økið innan fyri molarnar. Ásetingin í byggisamtyktini fyri havnaøkið forðar fyri, at hetta økið verður brúkt til annað enn havnaendamál.
Sum dømi um hetta er økið úti á Klyvum, har gamla flakavirkið stendur.
Á økinum er:

- ein stórur bygningur, sum eftir leigusáttmálanum bara skal brúkast í sambandi við havnaendamál
- øki til ruskbingjur
- egningarskúrar, har tað nú bert er avmarkað egning í einum skúri
- órudd hjá Tórshavnar kommunu og nólsoyingum annars

Tað einasta sum verður brúkt til havnaendamál, er tann gamli molin og økið, sum liggur uppat har, umframt sjálv bryggjan úti á Klyvum, har Ternan leggur at.

Uppskotið er at broyta byggisamtyktina sum sýnt á skjali *Nólsoy – eftir broyting* (17/03069-4). Sum omanfyri nevnt forðar núverandi byggisamtykt fyri økinum innan fyri molarnar, at økið verður nýtt til annað enn havnavirksemi hóast fleiri møguleikar eru at prýða um í økinum og skapa eitt umhvørvi, ið kann gerast til gagns fyri ferðafólk, ið koma á land og sjálvsagt íbúgvunum í Nólsoy.

Ætlanin er at arbeiða víðari við økinum, ið eftir broyting liggur uttan byggisamtykt og at betra um viðurskiftini á økinum bæði á ein sjónligan og innbjóðandi hátt fyri borgarum í Nólsoynni og ferðafólki. Økið skal í framtíðini verða brúkt til onnur endamál, har kanska bæði vinna og mentan kunnu saman skapa lív í umhvørvinum. Hetta vil umsitingin arbeiða víðari við.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingarnar fyri C øki í serstøku byggisamtyktini fyri Nólsoy eru:

*§ 20. øki C: Havnarøki*
*Havnarøki*
*1. Økið verður lagt av til havnaendamál (herundir eisini bátahavnir) og virki, ið hava samband við skipaferðslu, samferðslu, fiskivinnu og til virksemi, ið hevur samband við tey, bilstøðlar o.t..*
*2. Byggingarstigið fyri havnarøkið, sum heild, má ikki fara upp um 0,3.*
*3. Eingir bygningar ella einstakir partar teirra mugu vera hægri enn 8,5 m yvir miðaljørðildi (miðal við húsahornini).*
*4. Bygging til vinnuendamál má ikki verða sett nærri bryggjutrom enn 15 m ella nærri aðrari bygging enn 5 m.*

**Skjøl**
Nólsoy – fyri broyting (17/03069-4)
Nólsoy – eftir broyting (17/03069-4)

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at góðkenna uppskotið um broyting av byggisamtyktini fyri havnaøkið í Nólsoy, soleiðis at Tórshavnar havn umsitur økið, ið er teimum viðkomandi, at umsitingin arbeiðir víðari við økinum, ið verður uttan byggisamtykt og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. november 2017:** Málið umrøtt og verður lagt fyri nevndina aftur.

Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Havnaøkið, ið stendur uttanfyri byggisamtykt, sí kortskjøl *Nólsoy – fyri broyting og Nólsoy – eftir broyting* (17/03069-4) hevur verið til viðgerð hjá býarskipanardeildini í samband við at menna bygdina býarskipanarliga.

**4. grundumráði**
Í fyrru viðgerð av hesum máli, umrøddi býarskipanarnevndin 8. november 2017 uppskotið frá Tórshavnar havn um at minka um havnaøkið í byggisamtyktini. Broytingin vil úrslitað í at lendið vestan fyri kirkjuna, lendið millum Malarenda og undir Botnagarð og við heimara Hálgutoftir (Njúgvusteinar) verður til 4. grundumráði, sí kortskjølini *Nólsoy – fyri broyting og Nólsoy – eftir broyting* (17/03069-4).
Umsitingin mælir til at broyta økini til 4. grundumráði vegna, at lendið ikki er viðkomandi fyri Tórshavnar havn at umsita og er fjøra og liggur, í hvussu er í verandi líki, ikki tøkt til bygging ella øðrum virksemi enn náttúran bjóðar.
Stykkið við neystini millum Malarenda og undir Botnagarð er eisini fjøra og mælir umsitingin til eisini at vera 4. grundumráði. Hetta er fyri at varðveita fjøruna sum hon er, soleiðis at fólk til gongu kunnu fáa eina nátturliga uppliving av at økinum.

Í verandi løtu stendur ein bygningur sunnast á havnaøkinum við egningarskúrum (Lonin), har eingin skúrur verður brúktur til uppruna endamálið í løtuni. Tætt við egningarskúrarnar stendur sokkul eftir oljutangum, sum nú eru fluttir. Í heimara endanum á havnaøkinum stendur ein bygningur, ið brandstøðin brúkar.

Á økinum eru:

- Lonin, matr. nr. 34e.
- Sokkul, matr. nr. 34d.
- Gamalt flakavirki, matr. nr. 34c. Útleigað til vinnuvirksemi.
- Brandstøð, matr. nr. 129c.

Tórshavnar kommuna eigur alt lendið sum bygningarnir standa á. Sí kortskjal *Havnaøkið - bygningar* (17/03069-4).

**Oljutangarnir og brandstøðin**
Har sum oljutangarnir vóru stendur sokkulin enn. Brandstøðin heldur til í gomlu smiðjuni. Kommunan hevur gjørt avtalu við Sløkkilið um at kommunal fólk í Nólsoynni skulu nýta ein part av bygninginum. Vindeygu og hurðar eru komnar til bygningin og fer renovering í gongd í næstum.

**Flakavirkið**
Frank Hellisdal hevur virksemi í bygninginum og Tórshavnar havn eigur lendið. Í aðru helvtini hevur hann campingvognar standandi um veturin, og hin helvtin er goymsla til amboð o.a.
Sp/f Maskingrevstur yvirtók virkisbygningin á leigaða økinum matr. nr. 34c, Nólsoy, hvørs eigari er Tórshavnar kommuna. Leigusáttmálin er sambært tinglýsingini galdandi í 25 ár. Sáttmálin varð undirskrivaður í 2009. Sí mál nr. 2008-4390.

**Parkeringsøki**
Ein møguleiki er at skipa økið við m.a. parkering. Frá landsynningshorninum á flakarvirkinum og heimeftir kundi parkering verðið gjørd. Til ferðandi, til tey ið búgva ella vitja á oynni. Sunnanfyri flakarvirkið kundi verið avmerkt til bilar at bíða, ið skulu við Ternuni. Bilar sum koma á land kunnu koyra beint á havnaøkið og parkera bilin ella koyra inn í bygdina ígjøgnum parkeringsøki, sí kortskjal *Nólsoy – parkering og mentan (17/03069-4)*. Møguligt kann eisini vera at koyra til høgru niðan eftir brekkuni (Malarendavegur), um ørindi skuldi verið gjørd til eitt møguligt hotell, sí mál nr. 14/00390. Á Korndalsgøtu er eitt mál um eitt møguligt hotell undir viðgerð. Parkeringsøkið kundi natúrliga verið til vitjandi á hotellinum.
Tað er ikki óhugsandi at flakarvirkið í framtíðini kann nýtast til kommunalt virksemi, skuldi kommunan yvirtikið bygningin. Har eru alskyns møguleikar til havnavirksemi, ídnað ella mentan.

**Mentan í havnaøki**
Á heystið 2016 fekk Tórshavnar kommuna umsókn frá Stuðulsnevndini fyri svimjihyli í Nólsoy um yvirtøku av øllum skyldum viðvíkjandi matr. nr. 126a, ið er eystanfyri Nólsoyar skúla. Nevndin metir tað vera ósannlíkt, at hon klárar at fullføra verkætlanina við svimjihyli og hevur nú ístaðin í hyggju at broyta endamálið í viðtøkunum og heldur fara undir at gera eitt savn til minnis um Ova Joensen og hansara roysni. Sí mál nr. 16/03741 um Ovasavnið.

Trý uppskot hava verið fyri nevnd og eru tey Royndarhúsið, Avhaldshúsið og Lonin.
Lonin er egningarskúrarnir og er møguleiki at nýta nakrar skúrar til goymslu og bíðirúm hjá Strandferðsluni. Tveir skúrar kunnu við vælvild verða til Ovasavn. Skilaveggur kann brótast niður og sleppur Diana Victoria, bátur hjá Ova, at standa har við øðrum savnatilfari, so fær bæði bátur og savn betri umstøður enn í verandi løtu, har báturin nær er kloymdur í neystinum undir Kunningarstovuni.
Harafturat manglar Heimavirkið, sum í fleiri ár hevur verið sera virkið og væl vitjað av nólsoyingum og ferðandi, betri umstøður at virka undir. Tá Heimavirkið helt til í Geilini vóru húsini hugnalig, men ov smá. Í verandi løtu halda tey til í kjallaranum í Avhaldshúsinum og

tað er eisini ov smátt og fólk, ið spáka framvið síggja illa, hvat virksemi er har. Heimavirkið kann við vælvild eisini hugsast verða staðsett í Lonini.

Tó krevur Lonin smærri ábøtur. Verða teir málaðir og ljósperurnar, sum eru yvir hurðunum, skiftar út, so er bygningurin sum nýggjur og leggja avvarðandi av bygninginum afturat, at bygningurin er í góðum standi annars.
Omanfyristandandi eru bert dømi um mentanarvirksemi, sum kann staðsetast í havnaøkinum. Yvirhøvur hava nólsoyingar víst áhuga og eldhuga at menna bygdina sum heild og er eingin ivi um, at eitt møguligt mentanarøkið í havnaøkinum kann virka til menning og tilboð til íbúgvar og ferðandi í Nólsoynni. Við einari broyting í ásetingunum, har rúm er fyri vinnu og mentan hond í hond gerast møguleikarnir fleiri.
Umsitingin mælir til eitt tætt samstarvs millum Tórshavnar kommunu, staðbundnu nevndina og nólsoyingar yvirhøvur, soleiðis at átøk kunnu fremjast á økinum, sprett úr lokalum uppskotum og visjónum, sum tænir borgarum og vitjandi á oynni.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingarnar fyri D øki í serstøku byggisamtyktini fyri Nólsoy eru:
*§ 21. øki D: Almennir stovnar og mentan*
*1. Økið verður lagt av til almennar stovnar, undirvísing, mentanarlig endamál, átrúnaðarlig, heilsulig endamál o.t..*
*2. Innan fyri økispartarnar mugu bara verða gjørd slík virki ella bygningar, ið samsvara við endamálið hjá avvarðandi økispørtum og tænastuvirksemi, ið hava samband við tey.*
*3. Nettonýtingarstigið má ikki fara upp um 0,3 m.*
*4. Bygningar kunnu bara verða bygdir*

Ásetingarnar fyri 4. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu:

**Onnur mál, ið hava týdning fyri málið:**
16/03741 - Stuðulsnevndin fyri svimjihyl í Nólsoy : Umsókn um at TK yvirtekur matr. nr. 126a, Nólsoy móti at tey fáa matr. nr. 147c, 19 ella 92a, Nólsoy til eitt savn til minnis um Ova Joensen
2008-4390 – Áheitan frá Advokatfelagnum vegna Sp/f Manskingrevstur at broyta leigusáttmálin á matr. nr. 34c, Nólsoy.

**Skjøl:**
Nólsoy – fyri broyting (17/03069-4)
Nólsoy – eftir broyting (17/03069-4)
Havnaøkið – bygningar (17/03069-4)
Fyrispurningur um Ovasavn (17/03069-4)
Nólsoy – parkering o.a. (17/03069-4).

**Tilmæli:**
Virkandi býararkitekturin mælir til at uppskotið um broyting av byggisamtyktini fyri havnaøkið í Nólsoy verður broytt samsvarandi við kortskjølunum, treytað av at staðbundna nevndin verður kunnað og fær møguleika at gera viðmerkingar og síðani beina málið í býráðið.

**Nólsoyarnevndin 22. februar 2018:** Nevndin mælir til at býarskipanardeildin arbeiðir víðari við málinum. Nevndin tekur undir við at økið verður broytt til B6, men atlit verður tikið at tí virkseminum sum er í dag og at tillagingar kunnu gerast. Ynski er at sandurin á Malarenda verður broytt til grundøki 4.

**Ískoyti:**

Málið um broyting av byggisamtyktini fyri havnaøkið í Nólsoy hevur verið til viðgerðar í staðbundnu nevndini. Umrøtt varð, hvat man skuldi brúka økið úti á Klivum, sum eftir broytingina ikki longur liggur í øki C, til.

Býarskipanardeildin legði fyri staðbundnu nevndini fram uppskot um at broyta økið til mentan, og metti nevndin, at um man broytir økið til mentan, so kann tað tykjast ov bundið, og nakað av virkseminum sum er í økinum í løtuni, kann ikki halda áfram har. Teirra meting er eisini, at økið, sum tað liggur í løtuni, ikki er serliga væl egnað til einans at rúma mentanarligum virksemi. Tey ynskja, at økið kann nýtast til meira fjølbroytt virksemi, og skal rúma bæði mentan, smáum vinnuvirksemi, smábátavirksemi, goymslu, tænastuvirksemi o.ø. Viðvíkjandi sandinum á Malarenda ynskir staðbundna nevndin, at økið verður broytt til 4. Grundumráði.

Við viðmerkingunum frá staðbundnu nevndini í huga, verður uppskot lagt fram um at leggja eina nýggja økisáseting, øki B1, inn í byggisamtyktina fyri Nólsoy, og leggja ein part av tí økinum, sum eftir broytingina ikki liggur í øki C, í øki B1. Skotið verður upp, at ásetingarnar í øki B1 eru líkar ásetingunum í B6 økjum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, tó við onkrum tillagingum til viðurskifti í Nólsoy.

Ásetingar fyri øki B1 - vinnuøki í byggisamtyktini fyri Nólsoy:

1. *Loyvt er einans at gera virki og byggja hús, ætlað til mentan, tænastuvirksemi, smábátavirksemi, goymslu og miðstaðarbygging, t.e. handlar, skrivstovur, heilsubótarhøli, samkomuhús og tílíkt.*
2. *Virkini í hesum umráðispartinum skulu kunna flokkast í umhvørvisflokkunum 1-4 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.*
3. *Byggistigið má ikki fara upp um 0,5.*
4. *Eingi hús ella húsalutur má vera hægri enn 8 m.*

Somuleiðis verður skotið upp, at økið við sandin á Malarenda verður broytt til 4. Grundumráði, sambært kortskjali Nólsoy – eftir broyting (17/03069-4).

**Tilmæli:**
Virkandi býararkitekturin mælir til, at byggisamtyktin verður broytt sambært kortskjalinum *Nólsoy – eftir broyting*, at byggisamtyktin fær eina nýggja økisáseting B1 og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Einmælt samtykt.

Bergun Kass luttók ikki í viðgerðini av málinum.

# 65/18 Umsókn um at broyta byggisamtyktina í sambandi við matr. nr. 1292f og 1292a, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2018 | 38/18 | 18/00747-3 |
| 2 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 65/18 | 18/00747-3 |

**Upprunin til málið:**
Tórshavnar kommuna hevur fingið umsókn um at byggja hotell á matr. nr. 1292f og 1292a, við Oknarvegin.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í sambandi við ætlanir um at byggja hotell við Oknarvegin skal marknaumskipan fara fram millum matr. nr. 1292f, Tórshavn og matr. nr. 1292a, Tórshavn, sambært skjal nr. *18/00747-4 – Marknaumskipan.*

Matr. nr. 1292f og 1292a, Tórshavn liggja í øki A1 og C3 í 3. Grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Fyri at marknaðarumskipa matriklarnar og fyri at loyvi skal kunna verða at byggja hotell í økinum, má alt økið broytast til C3 øki.

Býarskipanardeildin metir, at hetta hóskar seg væl, av tí tað verður ein natúrlig leinging av tí C3 økinum, sum longu er. Hettar hevur eisini við sær eina meira natúrliga avmarking av A1 økinum, ið liggur eystanfyri økið, sum ætlanir eru at byggja hotell á.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu eru millum annað:

1. *Loyvt er einans at byggja stakhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð, og eftir serloyvi frá byggivaldinum tvíhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð og raðhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski.*

Ásetingar fyri C3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu eru millum annað:

1. *Umráðisparturin verður í síni heild lagdur til miðstaendamál, t.e. handlar, skrivstovuhøli, ráðleggingarvirki og tænastuvirki, ið hava samband við hetta. Loyvt er eisini at byggja skúlar, almennar stovnar og íbúðir.*

Umframt at økið, eftir broyting, liggur C3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, liggur økið eisini í serstøku byggisamtykt nr. 3, B1 og eru ásetingar har millum annað:

> *Eindirnar B1, B2 og B3 kunnu bert verða nýttar til handilsbúðir, skrivstovur, fyrisiting, heilsubótarhøli, byggingar til mentanar-endamál (bókasavn, kykmyndahøll o.a.) og tílíkt.*

Sostatt er eitt hotell ikki í stríð við ásetingarnar fyri C3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, ella ásetingarnar fyri B1 øki í serstøku byggisamtykt nr. 3.

**Skjøl**
18/00747-2 – *Ávegis myndugleikauppskot_smallsize*
18/00747-4 – *Marknaumskipan*
18/00747-5 – *Hotel Oknarvegur – fyri broyting*

18/00747-5 – *HotelOknarvegur – eftir broyting*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvis avleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:**
Virkandi býararkitekturin mælir til at góðkenna uppskotið um at broyta almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu sambært kortskjølunum og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Einmælt samtykt.

Bergun Kass luttók ikki í viðgerðini av málinum.

# 66/18 Frílendi í Hoydølum - skýli á matr. nr. 58a, Hoyvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.11.2017 | 220/17 | 17/03502-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 15.11.2017 | 273/17 | 17/03502-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2018 | 39/18 | 17/03502-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 14.03.2018 | 80/18 | 17/03502-1 |
| 5 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 66/18 | 17/03502-1 |

**Upprunin til málið:**
Frílendisætlanin í Hoydølum, politisk ætlan fyri dalin framvið Hoydalsá, j. nr. 14/00813-13.

**Lýsing av málinum - samandráttur**
At byggja tvinni skýli til frítíðarvirksemi, sokallaði “shelters” har fólk kunna søkja sær skjól. Bygningarnir eru 2,75 m x 3.65 m x 1,5 m, timbur við flagtaki.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ætlaða byggingin er í Hoydølum í umráðisparti D1, við serstakari byggisamtykt frá 1996, harumframt eru ásetingar um náttúrufriðing (skriv er sent náttúrufriðingarmyndugleikanum) og fráleika til stórar áir. Søkjast skal somuleiðis um byggiloyvi.

Staðsetingin av skýlunum liggur innanfyri viðarlundaøkið, ásetingarnar í serstøku byggisamtykt eru:

*8. gr.* ***Bygging, stødd, staðfesting og skapilsi húsanna o.a.***
*a. Á økinum skal ikki verða bygt.*
*b. Tó kann á økinum A í frámerkta D3-partinum verða bygt til almennar stovnar (skúla) aftur at verandi bygningum eftir ætlan, sum byggimyndugleikin og náttúru- og skógfriðingarmyndugleikarnir hava góðkent.*
*c. Á økinum C kunnu verða bygdir amboðsskúrar til urtagarðsrøkt, í mesta lagi 10 m² til víddar og eftir nærri góðkendum reglum.*

*11. gr.* ***Undantaksloyvi frá byggisamtyktini og broytingar í henni.***
*Byggimyndugleikin kann geva loyvi til smávegis frávik frá reglunum í hesi byggisamtykt, um so er, at dámurin av náttúruøkinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa og varðveita, verður ikki broyttur av teirri orsøk.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Liggur á matr. nr 58a, trøð í Hoydølum, um 13.600 m$^2$ til víddar. Trøðin er partur av makaskiftinum við Mentamálaráðið og skúladepilin Glasir, ið er partur av lendisætlanini fyri ovastu Hoydalar. Makaskiftisskeytið liggur til avgreiðslu hjá løgdeild kommununnar.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Bygging av tveimum skýlum uml. 20 m$^2$ tilsamans

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ongin viðmerking

**Umhvørvisárin**

Umhvørvisflokkin 0

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Mentamáladeildin metir at slík skýli kunnu viðvirka til at gera tað enn meiri áhugavert og hugaligt at ferðast eftir lendisgøtunum tað verið seg við rørslu ella ítrótti fyri eyga, bæði hjá einstaklingum og bólkum. Sum eitt ískoyti til verkætlanina kundi verið umhugsað at framleitt okkurt slag av kunning ella upplýsing um t.d. náttúru, mentan v.m., ið er viðkomandi í mun til økið. Eitt nú kunning um frílendisætlanina, vøkstur ella djóralív í økinum ella eitt hvørt forvitnisligt innan mentan, siðsøgu v.m.

**Skjøl**

| | |
|---|---|
| TK journal nr. 17/03502-3 | Shelter_skitsa 1 |
| TK journal nr. 17/03502-3 | Shelter_skitsa 2 |
| TK journal nr. 17/03502-3 | Shelter_skitsa 3 |
| TK journal nr. 17/03502-3 | Shelter_konstruktión 1 |
| TK journal nr. 17/03502-3 | Shelter_konstruktión 2 |
| TK journal nr. 17/03502-3 | Shelter_mát |
| TK journal nr. 17/03502-3 | Krógv (framløga) |
| TK journal nr. 17/03502-4 | Serstøk byggisamtykt fyri økið fram við Hoydalsá_kort |
| TK journal nr. 17/03502-5 | Frílendisætlanin_framløga |

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávisar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | x | | | |
| **Umhvørvis avleiðingar** | | x | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | x | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**
Eftir ætlan verða tvey skýli gjørd fyri ávikavist 80.000 kr. stykkið.

Tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til, at játtaðar verða 160.000 kr. av verkætlan L62023 “Frílendið við Hoydalsá” til at fremja verkætlanina ultimo 2017 og primo 2018.

| | Rakstrarjáttan | Løgujáttan |
|---|---|---|
| **Samlaður kostnaður** | Dkk | Dkk 160.000 |
| **Kostnaður í hesum árinum** | Dkk | Dkk 80.000 |
| **Tíðarætlan (byrjan/endi)** | Dato | Dato 2017-2018 |
| **Avleiðingar á rakstur** | | Dkk |

**Játtan:**

| | Á | | | Av | | | Lokað | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Upphædd íalt** | **Deild** | **Verkætlan** | | **Deild** | **Verkætlan** | | **verkætlan** | **Eykajáttan** |
| Dkk 160.000 | 6275 | Gomul | | 6275 | L62023 | | | |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>22. mars 2018 | Blað nr.: 185 |
| | Formansins merki: |

| **Útgreining:** | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at játta kr. 160.000 av verkætlan L62023 “Frílendið við Hoydalsá” til verkætlanina at fremja tvinni skýli ultimo 2017 og primo 2018, at heimila umsitingini at biðja Skógrøkt um gerð av arbeiðinum, og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 15. november 2017:** Samtykt at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina at umrøða og endurskoða útsjóndina á skýlunum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur umrøtt útsjóndina á skýlunum, sum eru evnaði til staðsetingina og umhvørvið, og gjørt smærri tillagingar í mun til útsjóndina og myndina av ætlaða skýlinum, sí skjalið *skýli,* journal nr. 17/03502-8.

**Tilmæli:**
Virkandi býararkitekturin vísir til tilmælið omanfyri, har mælt verður til at játta kr. 160.000 av verkætlan L62023 “Frílendið við Hoydalsá” til verkætlanina at fremja tvinni skýli primo 2018, at heimila umsitingini at biðja Skógrøkt um gerð av arbeiðinum, og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Atkvøtt varð um uppskot frá Annfinni Brekkstein at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina, ið varð einmælt samtykt.

Bergun Kass luttók ikki í viðgerðini av málinum.

## 67/18 Lendisgøtur 2018

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2018 | 40/18 | 18/00992-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.03.2018 | 81/18 | 18/00992-1 |
| 3 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 67/18 | 18/00992-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Ein mió. kr. eru avsettar á íløgum 2018 til lendisgøtur og verður mælt til at gera hesa raðfesting:
1. Sandá heimari partur av gøtuni 765 m
2. Part av 235 m ringgøtuni í Villingadalsfoss.

Kostnaður er mettur til 1 mió. kr.

Ad. 1. Framhald og nýgerð av gøtu við Sandá, nýgerð av gøtu uml. 765 m.
Búnaðarjørð, krevur skrivligt samtykki frá Búnaðarstovuni og festara.

Ad. 2. Nýgerð av gøtu við Villingadalsfoss, niðan á fossin. So langt sum 235.000 kr. røkka.
Búnaðarjørð, krevur skrivligt samtykki frá Búnaðarstovuni og festara.

Havast skal í huga ognarviðurskifti, brúksrættindi, viðlíkahaldsskyldur, kostnaður og fígging. Avgerandi er, at eigarin av lendinum gevur loyvi, har sum kommunan ikki eigur, og at ferðslurættindi verða lýst á farleiðina, antin sum servituttur ella onnur avtala.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at játtaðar verða kr. 1 mió. av løgukarminum L00001 á konto 6275 Fríðkan av kommununi til framhaldandi gerð av lendisgøtum og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Einmælt samtykt.

Bergun Kass luttók ikki í viðgerðini av málinum.

# 68/18 Fráboðan um vegskráningin á matr. nr. 23l, Velbastað er so illa frágingin, at tað ríður undan vegnum oman á matr. nr. 23k, Velbastað

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 30.04.2014 | 71/14 | 14/00178-42 |
| 2 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 04.11.2014 | 22/14 | 14/00178-42 |
| 3 Fíggjarnevndin | 19.05.2014 | 150/14 | 14/00178-42 |
| 4 Býráðsfundur | 22.05.2014 | 81/14 | 14/00178-42 |
| 5 Tekniska nevnd | 12.09.2017 | 44/17 | 14/00178-42 |
| 6 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 18.09.2017 | 4/17 | 14/00178-42 |
| 7 Tekniska nevnd | 06.03.2018 | 15/18 | 14/00178-42 |
| 8 Fíggjarnevndin | 14.03.2018 | 73/18 | 14/00178-42 |
| 9 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 68/18 | 14/00178-42 |

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Annfinn Brekkstein hevur vent sær til umsitingina og boðað frá, at arbeiðið kring vegin á Símunartrøð á Velbastað matr. nr. 23l, Velbastað, er ov illa frágingið. Fram við ognunum matr. nr 23i og 23k, Velbastað er stórur hæddarmunur millum vegin og túnið hjá matrikuleigarunum og hetta førir við sær, at tað ríðir undan vegnum. Annfiinn Brekkstein hevur spurt, vegna eigararnar, um kommunan kann luttaka í kostnaðinum at gera stuðlamúr fram við omanfyri nevndu ognum.

Sambært ikki undirskrivaðum avhendingarskjali, dagf. 19/10-2004, eru staðfestir manglar so sum bakkantur og asfaltering og eftirfylgjandi staðfest eitt afturhald álj. kr. 63.825,- (u/mvg).

Sambært projektinum, ið var gjørt av Una Patursson og táverandi Velbastaðar kommunu, framgongur ongastaðni, at stuðlamúrur skal gerast á markinum millum vegin og ognirnar nr. 6 og 8 á Símunartrøð.

Tekniska nevnd skal taka støðu til spurningin um kommunan vil luttaka í gerð av stuðlamúrinum. Nevndin skal eisini taka støðu til um kommunan skal luttaka í kostnaðinum at gera vegin lidnan. Vegurin er kommunalur og hevur matr. Nr 23l

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Tað fyriliggur eingin ítøkilig fíggjarlig uppgerð fyri umfangið av at gera vegin lidnan. Í sáttmálanum verður víst til ymsar veitingarpostar so sum kloakk og vatn, men tað fyriliggja eingir kloakk-, vatn- og gøtuljósplanir í málinum og tískil er trupult at meta um kostnaðin fyri liðuggerð av vegnum.

Tekniska nevnd skal taka støðu til spurningin um kommunan vil luttaka í gerð av stuðlamúrinum. Stuðlamúrurin var ikki við í upprunaliga priojektinum – har var staðsettur skrái.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at halda fast við upprunaprojektið og mæla frá at kommunan luttekur í kostnaðinum fyri stuðlamúrin.

**Tekniska nevnd 4. mars 2010:** Nevndin samtykti at heita teknisku umsitingini at lýsa málið nærri, at leggja fyri teknisku nevnd aftur.

**Ískoyti:**
Umsitignin hevur, saman við ráðgeva, latið gera eina kostnaðarmeting fyri liðuggerð av íbúðarvegnum.
Saman við tilgongdini í sambandi við liðuggerðina av vegnum, hava eigararnir av matr. nr. 23n, Velbastað (mál nr. 2011-1101) vent sær til kommununa og sóknast eftir, hvørjar ætlanir eru í sambandi við liðuggerðina av vegnum. Víst verður á, at tað ikki fer at bera til at byggja sethúsini eftir verandi umstøðum. Hetta tí tey standa til at eiga langt út á verandi veg, og at stóri hæddarmunurin millum ætlaða planeraða lendið á teirra matrikli og verandi veg fer at føra við sær antin høgan betong garð ella stóran skráa.
Umsitingin hevur havt samskifti við eigararnar og komið er fram til eina hóskandi loysn fyri tey og kommununa.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Sambært metingini kemur liðuggerðin av vegnum at kosta uml. kr. 713.000,-. Víst verður á, at peningur ikki er settur av til arbeiðið í 2011.

Umsitingin hevur ætlanir um at halda ástaðarfund við verandi matrikuleigarar, fyri at umrøða spurningin um eina møguliga marknaumskipan við eigararnar av matr. nr. 23n, Velbastað, og annars um liðuggerðina av vegnum. Mett verður, at tað kann bera til, at gera eina avtalu um marknaumskipan, uttan at neyðugt er at fara undir ábøtur av vegnum í ár, tí einki er sett av til arbeiðið í 2011.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at arbeitt verður eftir teirri loysn, at uml. 28 fermetrar av verandi vendiplássi verða nýttir til skráa at kompensera fyri stóra hæddarmuninum og at kommunan afturfyri fær uml 24-28 fermetrar av eystara parti av matr. nr. 23n, Velbastað.

Mælt verður til at heimila umsitingini, at gjørd verður ein avtala millum partarnar soleiðis, at tá tekniski parturin av málinum er liðugur, verður matrikulmálið lagt fyri fíggjarnevndina til endaliga staðfesting av marknaumskipanini.

Mælt verður harumframt til at málið um fígging av verkætlanini verður tikið upp til raðfesting í sambandi við viðgerðina av ársfíggjarætlanini.

**Tekniska nevnd 7. juni 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 8. juni 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 16. juni 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
**<u>Viðvíkjandi marknaumskipanina av matr 23l og matr. 23n á Velbastað eigari Jón Brian Hvidtfeldt og Evu Brekkstein.</u>**

Tórshavnar kommunu hevur sent ummæli til marknaumskipan til Umhvørvisstovuna.

Umhvørvisstovan hevur verið á staðnum og uppmált marknaumskipanina og boðar TK frá, at teir ikki kunnu fremja marknaumskipanina tí eigarin er farin út um markið við grótgarði sínum, markið er komið inn á vegin matr. 23l, við umleið 16 fermetrum.

Byggideildin hevur verið á staðnum og staðfest, at grótgarðurin ikki fylgir marknaðarlinjuni.

Vit hava sett okkum í samband við Jón Brian Hvidtfeldt, har hann hevur fingið boð um at steðga við arbeiðinum av garðinum á matr. nr. 23n. Velbastaður.

Jón Brian Hvidtfeldt hevur sent teldupostar aftur og fram, um at hann ikki er áhugaður at flyta garðin.
Sum málið liggur nú kann marknaumskipanin ikki farast fram fyrr enn viðurskiftini eru komin í rættlag í sambandi við nevndu16 fermetrarnar sum hann er farin inn á matr. 23l sum er vegurin.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at eigarin av matr. 23n fær boð um at flyta garðin soleiðis at hesin fylgir markinum og at freist verður sett upp á 8 vikur, og um boðini ikki verða fylgd, at senda málið til rættarliga viðgerð við kravi um at garðurin verður fluttur.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2012:** Ein meiriluti Levi Mørk, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen og Jan Christiansen samtyktu at umsitingin kannar eftir um bygt er sambært byggiloyvinum, áðrenn nevndin tekur støðu til málið.

Ein minniluti Vagnur Johannesen tók ikki støðu í málinum.

**-Ískoyti:**
Byggideildin hevur verið á staðnum og góðtikið avsetingina, sum tá vísti at húsið var 2,5 m frá niðara marki, sum byggiloyvi eisini er givið til.

Uppmátingar eru nú gjørdar á staðnum sum vísa, at eigarin hevur snarað húsið og flutt tað 0,68-0,80 m ov langt oman í mun til tað sum byggiloyvi er givið til
Í sunnara enda er húsið:
3,38 m frá markinum omanfyri, skal verða 2,7 m
1,70 m frá markinum niðanfyri, skal verða 2,5 m

Uppmátingarnar vísa eisini, at grótgarðurin er uppsettur væl uttanfyri markið.
Sostatt er ikki bygt samsvarandi byggiloyvinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin vísa til tilmælið frá 11.apríl 2012, at eigarin av matr. 23n fær boð um at flyta garðin soleiðis at hesin fylgir markinum og at freist verður sett upp á 8 vikur, og um boðini ikki verða fylgd, at senda málið til rættarliga viðgerð við kravi um at garðurin verður fluttur.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. mai 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**

Vísandi til at umsøkjanrin hin 20. juli 2012 (smb, mál nr. 2011-0137) hevur sent kommununi umbøn um marknaumskipan, skal tekniska nevnd skal taka støðu til um sethúsavegurin Símunartrøð skal lata meiri av vegaøki til endamálið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla frá at lata meiri øki av vegnum, vísandi til at hetta fer at darva til- og frákoyringarmøguleikunum enn meira, og at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Tekniska nevnd 11. oktober 2012:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal og Jákup Símun Simonsen, mælir til at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum.
Ein minniluti, Sjúrður Olsen, mælir til at borgarstjórin og tekniski stjórin fara undir samráðingar við umsøkjaran um at finna eina endaliga loysn á málinum.
Annfinn Brekkstein og Maria Hammer Olsen vóru ikki við til hetta málið.

**Ískoyti:**
Jón Brian Hvidtfeldt hevur í skrivi, dagf. 27. desember 2013, j. nr. 2011-0137/64, til býráðslimir greitt frá síni áskoðan um málið. Í hesum sambandi er innanhýsis notat gjørt til málið, ið víst verður til, og Løgdeildin og Byggi- og umhvørvisdeildin kunna um málið á fundinum.

**Tekniska nevnd 15. januar 2014:** Kunnað varð um málið.

Fíggjarnevndarlimur biður um at fáa málið á skrá.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2014:** Umsitingin fær heimild at finna eina loysn, ið verður at leggja fyri aftur teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Vísandi til samtykt í fíggjarnevndini 22. januar 2014, hevur umsitingin viðgjørt málið enn einaferð. Eisini hevur verið vitja á staðnum aftur, at hyggja at umstøðunum har. Løgdeildin hevur eisini gjørt metingar av løgfrøðiligu viðurskiftunum í sambandi við málið, herundir fyrisitingarligar meginreglur um líkheitsprinsippið, eins og gongdin í málinum er lýst.

Sum nøkur høvuðspunkt í málsgongdini kunnu nevnast:

1. Talan er um útstykking gjørd av fyrrverandi Kirkjubø-Velbastaðar kommunu, áðrenn kommunusamanleggingina. Manglar vóru við vegnum í útstykkingini, tá hann varð avleveraður, og hann varð ongantíð gjørdur liðugur. Tað vísti seg eisini, at hann var heldur ikki rætt staðsettur í sunnasta endanum, men kom nakað inn á matr. nr. 23n, samstundis sum hann var so illa frágingin, at tað reið undan vegskráanum á niðaru síðu. Seinni sóknaðist eigarin av matr. nr. 23n eftir eini loysn viðv. staðsetingini av vegnum og hæddarmuninum millum sítt grundøki og vegin. Hesi viðurskifti vóru orsøkin til, at Tórshavnar býráð, eftir kommunusamanleggingina, góðkendi makaskiftisavtalu við eigararnar av matr. nr. 23n, soleiðis at trupulleikarnir við staðsetingini av vegnum og hæddarmunurin til matr. nr. 23n, vóru loystir. Sí málslýsingina ovast fram til 16. juni 2011.

2. Tá eigarin av matr. nr. 23n søkti um byggiloyvi, var tað í fyrstu atløgu noktað, tí hann vildi byggja alt ov nær marki. Hann søkti síðani av nýggjum, har húsini vóru innanfyri ásetingarnar í byggisamtyktini, og makaskiftisavtaluni, og fekk tá játtað byggiloyvi.

3. Tá eigarin av matr. nr. 23n síðani fór undir at byggja, broytti hann staðsetingina av húsum sínum uttan fráboðan ella loyvi, og er staðsetingin av húsunum sostatt ikki gjørd sambært byggiloyvinum, hóast júst staðsetingin var ítøkiliga viðgjørd, áðrenn byggiloyvi varð játtað.

4. Tá eigarin av matr. nr. 23n síðani fór undir at byggja garð oman móti vegnum, broytti hann somuleiðis staðsetingina av garðinum uttan fráboðan ella loyvi, og er staðsetingin av garðinum hjá umsøkjaranum ikki gjørd sambært tí makaskiftisavtalu, sum partarnir gjørdu og býráðið samtykti.

5. Umsøkjarin flutti ikki grótgarðin, hóast hann var biðin um tað stutt eftir at hann var byrjaður uppá garðin. Hetta ger, at inntrivið at flyta garðin, eftir at eigarin gjørdi hann lidnan, gerst so mikið størri. Hinvegin er her talan um, at eigarin av garðinum gjørdi garðin lidnan, vælvitandi at hann var farin útum mark, og harvið ikki sjálvur tók nøkur stig til at minka um kostnaðin av at fáa viðurskiftini í rættlag, sambært givnum loyvum.

6. Umsøkjarin hevur, eftir at hann gjørdi garðin lidnan, á fundum við kommununa og skrivliga lagt upp til at finna eina pragmatiska loysn, uttan tó sjálvur at koma við uppskotum.

7. Grannarnir og almenna ferðslan á vegnum hava ampan av, at umsøkjarin hevur bygt grótgarðin longur út á vegin og vendiplássið enn avtalað og góðkent, meðan umsøkjarin ikki hevur ampar av hesum, tí hann nýtir ikki hendan atkomuvegin, men hevur sína innkoyring aðrastaðni.

8. Kommunan hevur, við atliti til meginregluna um líkheitsprinsippini í almennari fyrisiting, í øðrum málum um slíka ólógliga bygging og/ella bygging sambært góðkendari útstykkingarætlan, hildið fast um kravið at bygt verður sambært givnum loyvum og gjørdum avtalum.

Møguleikar, sum longu eru viðgjørdir fyrr, fult ella lutvíst eru:

*a)* At halda fast við, at allur garðurin verður fluttur í mark
*(Samtykt í byggi- og býarskipanarnevndin 14. mai 2012 og tekniska nevnd 11. okt. 2012)*

b) At halda fast við, at garðurin móti vendiplássinum verður fluttur í mark
*(Ikki viðgjørt fyri seg, men er fevnt av samtykt í byggi- og býarskipanarnevndin 14. mai 2012 og tekniska nevnd 11. okt. 2012)*

c) At halda fast við, at garðurin móti vegnum verður fluttur í mark
*(Ikki viðgjørt fyri seg, men er fevnt av samtykt í byggi- og býarskipanarnevndin 14. mai 2012 og tekniska nevnd 11. okt. 2012)*

d) At loyva at allur garðurin verður standandi
*(Er noktað í byggi- og býarskipanarnevndin 14. mai 2012 og tekniska nevnd 11. okt. 2012)*

<u>Viðv. a) og d):</u>
Viðvíkjandi loysnunum a) og d), er longu avgerð tikin í avvarðandi faknevndum - *byggi- og býarskipanarnevndin 14. mai 2012 og tekniska nevnd 11. okt. 2012* - um ikki at loyva at garðurin verður standandi har hann er, men skal fylgja markinum.

Av tí einki nýtt er í málinum, eiga hesir møguleikarnir, sambært vanligum fyrisitingarligum reglum, tí ikki at vera viðgjørdir aftur.

Viðv. b) og c):
Viðvíkjandi loysnunum b) og c), er talan um millumloysnir millum loysn a) og d), men hesar millumloysnir eru fevndar av tí longu tiknu avgerðini í byggi- og býarskipanarnevndini 14. mai 2012 um, at garðurin skal flytast, so hann fylgir markinum, og avgerðini í teknisku nevnd 11. okt. 2012, um ikki at lata meira av vendiplássinum og vegaøkinum.

Møguleikin at makaskifta soleiðis, at vendiplássi gerst umleið 7 m² størri í býti fyri lendi fram við vegnum, er viðgjørt í umisitingini. Mett verður ikki, at hetta er ein loysn í betrar samlaðu viðurskiftini á einum longu frammanundan truplum øki.

Niðurstøðan av nýggju viðgerðini er, at umsitingin kann ikki vísa á nýggjar møguleikar fyri loysnum, sum ikki longu eru viðgjørdar og støða tikin til í avvarðandi nevndum. Umsitingin vil samstundis vísa á týdningin av líkheitsprinsippinum í almennari fyrisiting, um politiski myndugleikin umhugsar at viðgera møguliga broyting av áður gjørdum nevndarsamtyktum í málinum.

**Tekniska nevnd 30. april 2014: Ein meiriluti, Elin Lindenskov, Sigrún Mohr og Marin Katrina Frýdal, samtykti at halda fast við samtyktirnar í byggi- og býarskipanarnevndini 14. mai 2012 og í teknisku nevnd 11. okt. 2012, m.a. vísandi til týdningin av líkheitsprinsippinum í almennari fyrisiting.**
**Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Bogi Andreasen, mælir til at loyva at allur garðurin verður standandi, móti at eigarin letur tilsvarandi lendi av grundøki sínum til kommununa.**
**Málið víst til fíggjarnevndina, vísandi til samtykt 22. jan. 2014.**

**Fíggjarnevnd 19. maj 2014: Annfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av hesum máli.**
**Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson og Sjúrður Olsen, mæla býráðnum til at taka undir við minnilutanum í teknisku nevnd.**

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðið fyri læstum hurðum 22. mai 2014: Samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti.**

Fyri atkvøddu: Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Jákup Dam, Bjørghild Djurhuus, Sjúrður Olsen, Rúni Djurhuus, Heðin Mortensen

Greiddi ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Elin Lindenskov og Marin Katrina Frýdal.

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 04. november 2014: Kunnað varð um málið.**

**Ískoyti:**
Heitt er á teknisku deild um at finna eina loysn á málinum millum Jón Brian Hvidtfelt og Tórshavnar kommunu. Sigast skal at hetta hevur verið eitt sera drúgt mál og sum framgongur niðanfyri hevur málið verið umrøtt í fleiri umførum. Málið er fyrr lýst í j.nr. 2006-0525, 2011-0137, 14/00178, 14/00609 og 16/01596. Tekniska deild hevur bæði áðrenn og eftir summarsteðgin verið í samband við JBH um at finna eina loysn, so málið kann verða avgreitt. Partarnir eru samdir um, at garðurin, sum partvís stendur á kommunalum øki, verður

standandi. Økið, sum garðurin stendur á kommunalum øki, er umleið 16 $m^2$, hesir fermetrarnir skulu tí latast kommununi aftur, við at makaskift verður við matr. 23n, sum víst á viðhefta korti. Blátt øki, umleið 16 $m^2$, ið JBH hevur tikið av vegnum, matr. nr. 23l. Grønt øki, umleið 16 $m^2$, ið JBH kann lata aftur til matr. nr. 23l. Eisini grannarnir í nr. 4, 6, 8 og 10 fáa gagn av hesi loysn.

Tekniska deild hevur verið á staðnum og hevur mett at henda loysn ikki hevur nakra neiliga ávirkan á vegin, sæð í mun til at næstan eingin ferðsla er á vegnum. Heldur ikki eru sløkkiliðsbilar ella ruskinnsavningarbilur tarnaðir av hesi loysn. Í dag eru bert tvey sethús, ið gera brúk av vegnum og kemur møguliga eitt afturat, um so er at eigarin av matr. nr. 23i ynskir at hava atkomu til umtalaða veg.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Fyri at gera útstykkingina lidna, og sum játtan er fingin til fyri 2017, so liggur í hesum, at gera stuðlamúr við innkoyringina í sunnara enda oman eftir, seta upp 2 ljósmastrar og at asfaltera (um 300 $m^2$). Roknað verður við at neyðugu átøkini kunna gerast fyri áleið kr. 400.000,-. Á konto “8175 Vegir” í fíggjarætlanini fyri 2017 eru avsettar kr. 0,8 mill. kr. til liðuggerð av Ervavegnum á Velbastað.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at nýta játtanina til endamálið og at seta ráðgeva at tekna stuðlamúr, fáa nýggja makaskiftisavtalu avgreidda og annars fáa arbeiðið framt.

**Tekniska nevnd 12. september 2017: Samtykt at taka undir við tilmælinum.**

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 18. september 2017: Kunnað varð um málið.**

**Ískoyti:**
Eftir at tekniska nevnd á fundi 12. september 2017 samtykti at gera útstykkingina lidna, komu tilboð inn ið lógu oman fyri løgujáttanina. Tí varð valt at bjóða hetta út av nýggjum. Tá nýggj tilboð komu inn, var árið so mikið útliðið, at tað ikki var ráðiligt at fara í gongd. Klárt er nú at fara í gongd og verður tí mælt til at taka av lægsta tilboðnum. Lægsta tilboð sum inn kom var áljóðandi kr. 551.274,- uttan mvg. Aftur at hesum skal asfalt leggjast. Mett verður at samlaði kostnaðurin á 800.000,- kr. kann haldast innanfyri játtanina.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka av lægsta tilboðnum áljóðandi 551.274,00 kr. uttan MVG, umframt asfaltering, samanlagt um 800.00,- kr. av konto 8175 Vegir, og beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Tekniska nevnd 06. mars 2018: Samtykt at taka undir við tilmælinum.**

**Fíggjarnevndin 14. mars 2018: Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.**

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Samtykt við 10 atkvøðum fyri, ongari ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Jógvan Arge, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Heðin Mortensen, Odd Færø og Bjørghild Djurhuus.

Blankt atkvøddi: Bjørg Dam.

Annfinn Brekkstein boðaði frammanundan viðgerðini frá, at hann er ógegnigur í málinum og bað um at sleppa av fundi. Býráðið tók hesa fráboðan til eftirtektar.

Bergun Kass luttók ikki í viðgerðini av málinum.

# 69/18 Planlegging av kloakkskipan á Stadionøkinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 29.11.2016 | 114/16 | 16/04347-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 433/16 | 16/04347-1 |
| 3 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 345/16 | 16/04347-1 |
| 4 Tekniska nevnd | 28.11.2017 | 76/17 | 16/04347-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 06.12.2017 | 298/17 | 16/04347-1 |
| 6 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 299/17 | 16/04347-1 |
| 7 Tekniska nevnd | 06.02.2018 | 7/18 | 16/04347-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 21.02.2018 | 46/18 | 16/04347-1 |
| 9 Býráðsfundur | 01.03.2018 | 41/18 | 16/04347-1 |
| 10 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 69/18 | 16/04347-1 |

**Málslýsing:**
Í sambandi við byggivirksemi á stadionøkinum í Gundadali er neyðugt at gera broytingar í kloakkskipanini á staðnum. Hetta er at taka støðu til umleggingar av verandi reinsiverki, somuleiðis umleggja og økja um dimensiónir av verandi og komandi kloakk- og yvirflatuvatns-leiðingum.

Fíggjarlig viðurskifti:
Samlaði fíggjartørvurin fyri arbeiðið er mettur til kr. 200.000,- sambært fíggjarligu uppgerð j.nr. 16/04347-3 og er ynskið at taka av tilboð frá PB-Consult at gera uppskot til loysn. J.nr. 16/04347-1

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at játta kr. 200.000,- av markaðum íløgum fyri kloakkir fyri 2016, konto 6875 (Kloakkir) og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 29. november 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
PB-Consult hevur lýst støðuna og vísir á loysn í samband við umlegging og dagføring av kloakkskipanini á Stadionøkinum í Gundadali, j.nr. 16/0347-7. Tekniska deild ynskir at halda fram við arbeiðinum og at fáa ráðgeva at gera prosjekt klárt til útbjóðing.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Samlaði fíggjartørvurin fyri arbeiðið er mettur til kr. 250.000,- sambært fíggjarligu uppgerð og er ynskið at taka av tilboð frá PB-Consult at gera uppskot til loysn. j.nr. 16/04347-7.

**Tilmæli:**

Býarverkfrøðingurin mælir til at játta kr. 250.000,- av markaðum íløgum fyri kloakkir fyri 2017, konto 6875 (Kloakkir) og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 28. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 06. desember 2017:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við byggivirksemi á stadionøkinum í Gundadali er neyðugt at gera broytingar í kloakkskipanini á staðnum. Hetta er at taka støðu til umleggingar av verandi reinsiverki, somuleiðis umleggja og økja um dimensiónir av verandi og komandi kloakk- og yvirflatuvatns-leiðingum

PB-Consult hevur lýst støðuna og vísir á loysn í sambandi við umlegging og dagføring av kloakkskipanini á Stadionøkinum í Gundadali, j.nr. 16/0347-7. Tekniska deild ynskir at halda fram við arbeiðinum, sambært uppskot 3, j.nr. 16/0347-7, og hevur sett ráðgeva gera prosjekt klárt til útbjóðing.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Samlaði fíggjartørvurin fyri arbeiðið er mettur til kr. 5 mió. - sambært fíggjarligu uppgerð16/04347-12, og ynskir umsitingin at fáa heimild at bjóða arbeiðið út.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin og virkandi tekniski stjórin mæla til at játta kr. 5 mió. til projektið. Herav. 2 mió. kr. av markaðum íløgum fyri kloakkir fyri 2018, konto 6875 (Kloakkir);
2 mió. kr. av konto 6175 umsiting og røkt av bygningum og restin (uml. 1 mió. kr.) av verkætlan fyri Tórsvøll vestara síða L57026 og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.
Umsitingin ynskir at fáa heimild at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión, at taka av lægsta tilboði og seta arbeiðið í gongd. Ætlandi skal arbeiðið byrja í vár, fyri ikki at fáa óneyðugar seinkingar í arbeiði at víðka um Tórsvøll.

**Tekniska nevnd 06. februar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. februar 2018:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 01. mars 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Einmælt samtykt.

Bergun Kass og Heðin Mortensen luttóku ikki í viðgerðini av málinum.

**FUNDURIN LOKIN KL. 21:00**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Annika Jacobina Olsen | Halla Samuelsen | Bogi Andreasen |
| Annfinn Brekkstein | Jákup Dam | Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal |
| Bjørghild Djurhuus | Turið Horn | Bergun Kass |
| Heðin Mortensen | Bjørg Dam | Jógvan Arge |
| | Odd Færø | |